# Kjakupplegg

um bygnaðin í landsfyrisitingini

# Kjakupplegg

um bygnaðin í landsfyrisitingini

Útgevari: Føroya Landsstýri
Útgivið: mars 2014
Ábyrgd: Løgmansskrivstovan

Uppseting, prent og liðuggerð: Føroyaprent

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit


Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

1. Landsfyrisitingin fram til umskipanina í 1997 . . . . . . . . . . . . . 9

2. Umskipanin í 1996-1997 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .13

3. Stjórnarráðini í dag . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .17

4. Uppgávurnar hjá einum stjórnarráði . . . . . . . . . . . . . . . . . . .23

5. Styrkir og veikleikar við verandi bygnaði . . . . . . . . . . . . . . . .27

6. Yvirlit yvir tillagingar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .33

7. Upplegg til orðaskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .35

Fylgiskjøl. . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .37

1. Løgmansskrivstovan § 2: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .39

2. Fíggjarmálaráðið § 3: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .41

3. Fiskimálaráðið § 5: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .43

4. Vinnumálaráðið § 6: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .45

5. Mentamálaráðið §7: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .47

6. Heilsumálaráðið § 11: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .49

7. Almannamálaráðið § 12: . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .51

8. Mett orkunýtsla í mun til virkisøki . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .53

9. Felags virðisgrundarlag fyri landsfyrisitingina . . . . . . . . . . . .55

10. Stjórnarráð í øðrum londum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .57

11. Tilfar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . .65

# Inngangur

Landsstýrið ynskir at seta bygnaðin í landsfyrisitingini aftur á dagsskrá, nú smá 18 ár eru liðin, síðan landsfyrisitingin varð grundleggjandi umskipað í serstøk stjórnarráð.

Stjórnarráðini vórðu sett á stovn í 1997, tí mett varð, at landsstýrisfólkini skuldu hava hvør sína fyrisiting, tá farið varð frá kollegialum stýri til ráðharrastýri. Harafturat varð staðfest, eins og § 19-nevndin kom fram til nøkur ár seinni, at tørvur var á at styrkja fyrisitingina: *„fyrisitingarligi førleikin í landsumsitingini vantaði, samanborið við tey stóru krøv, politiska leiðslan og skipanin settu... Hóast embætisverkið og málsviðgerarnir vóru dugnaligir, var ofta ógjørligt at lúka nógvu krøvini, ið vórðu sett til embætisverkið, ið var ovbyrjað frammanundan.“* (Frágreiðing um 80-árini, bls. 244).

Nógv kjak stóðst av umskipanini. Summi hildu, at talan hevði verið um eina ov afturlatna tilgongd, og at tørvur var á einum orðaskifti um, hvør skipan er best egnað til føroyska samfelagið. Harafturat settu summi spurnartekn við avgerðina um, at aðalstýrini skuldu skipast við at leggja deildir á fyrrverandi Landsskrivstovuni saman við viðkomandi stovnum ella stovnspørtum, heldur enn at skipa stjórnarráð í smærri, yvirskipaðar eindir.

Tað er ikki ósannlíkt, at ónøgdin um tilgongdina og manglandi orðaskiftið um leiklutin hjá føroysku landsfyrisitingini eru orsøkir til, at bygnaðurin í landsfyrisitingini hevur verið umrøddur javnan síðan umskipanina, og at serliga landsstýrisfólk og løgtingsfólk hava havt eitt afturvendandi ynski um at endurskoða hann.

Hóast nógvar tillagingar eru gjørdar síðan 1997, hava skiftandi landsstýri higartil hildið fast við meginreglurnar í skipanini við serstøkum stjórnarráðum.

Bygnaðurin hevur ongantíð verið endurskoðaður, síðan hann varð settur í verk, hóast krøvini til almennu skipanina gerast alsamt størri. Sama gongdin er at síggja í londunum rundan um okkum, men stóri munurin er, at Føroyar eru eitt sera lítið samfelag, ið stórt sæð skal hava somu tænastur og uppgávur sum tey lond, vit plaga at samanbera okkum við. Avbjóðingin er sostatt í enn størri mun at fáa so smidlig og effektiv stjórnarráð, sum gjørligt. Tí stjórnarráðini eru kjarnin í føroyskari fyrisiting. Tað er har, fyrstu stigini verða tikin til at gera ynskini hjá teimum fólkavaldu til veruleika. Stjórnarráðini fyrireika flestu mál, sum verða løgd fyri tingið, og tey skulu syrgja fyri, at málini verða sett í verk á skynsaman hátt.

Landsstýrið metir, at tørvur er á at skipa landsfyrisitingina av nýggjum fyri at leggja arbeiðið meira rationelt til rættis og fyri at styrkja fakliga umhvørvið. Í løgtingsfíggjarlógini fyri 2014 stendur, at ætlanin er: *„At endurskoða verandi bygnað og gera uppskot til ein nýggjan bygnað, ið kann stuðla undir eina rationalisering av virkseminum í landsfyrisitingini.“* Sum liður í hesum ætlar Landsstýrið at spara 5 mió. kr. í 2015 og 10 mió. kr. í 2016 og í komandi árum í landsfyrisitingini.

Fyri at seta gongd á aftur orðaskiftið, um verandi bygnaður er tann rætti fyri føroyska samfelagið, og fyri at tryggja eitt so haldgott grundarlag sum gjørligt fyri ætlanini um at skipa landsfyrisitingina av nýggjum, hevur Landsstýrið gjørt av at fara undir eina verkætlan, sum skal meta um styrkir og veikleikar í verandi bygnaði og orða uppskot um, hvørjar tillagingar kunnu gerast fyri at tryggja ein sterkari og skynsamari bygnað.

Landsstýrið ynskir eina opna og savnandi tilgongd. Tí verður verkætlanin fyrst

og fremst skipað kring eina hoyring, har øll áhugað fáa høvi at greiða frá sínum hugsanum um verandi bygnað í landsfyrisitingini, og hvørt tørvur er á tillagingum.

Endamálið við hesum kjakuppleggi er at tryggja eitt felags útgangsstøði fyri hoyringina. Uppleggið er skipað í sjey partar. Fyrsti partur lýsir landsfyrisitingina fram til 1997. Annar partur lýsir umskipanina í 1996 og 1997. Triði partur lýsir verandi bygnað í landsfyrisitingini. Fjórði partur er uppskot um eina lýsing av, hvørjar uppgávur eiga at liggja í einum stjórnarráði. Við støði í hesum pørtum verður í fimta parti skift orð um styrkir og veikleikar í verandi skipan, og sett verða fram uppskot um, hvørjar tillagingar kunnu gerast fyri at bøta um veikleikarnar. Í sætta parti er yvirlit yvir uppskotini um tillagingar, sum hava sum fortreyt, at bygnaðarligar broytingar verða framdar, og í sjeynda parti verður lagt upp til orðaskifti.

Í fylgiskjølunum eru m.a. lýsingar av uppgávunum og bygnaðinum í stjórnarráðunum. Harafturat er ein yvirskipað lýsing av, hvussu stjórnarráð í Norðurlondum, UK og Niðurlondum eru skipað.

Hoyringin verður skipað bæði við munnligum og skrivligum hoyringum. Tá hon er liðug, ger arbeiðsbólkurin ein samandrátt, sum lýsir sjónarmiðini, sum komu fram undir hoyringini. Síðan verður gjørt uppskot um, hvørjar tillagingar kunnu gerast fyri at gera bygnaðin skynsamari og fakliga umhvørvið sterkari. Uppskotið verður latið Landsstýrinum at taka støðu til. Tað er ikki partur av hesi verkætlan at finna ítøkiligar loysnir til, hvussu ætlaðu sparingarnar verða framdar. Hetta kann gerast fyri seg ella sum partur av eini møguligari íverksetanartilgongd, sum heldur ikki er fevnd av hesi verkætlan.

Verkætlanareigari er Landsstýrið, umboðað av løgmanni og landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Stýrisbólkur er stjóraráðið, umboðað av Marjuni Hanusardóttir, løgmansstjóra, og Bjarna Askham Bjarnason, aðalstjóra í Fíggjarmálaráðnum. Arbeiðsbólkurin er mannaður av starvsfólkum í landsfyrisitingini, sum hava royndir og innlit í viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri eina miðfyrisiting. Tey eru Elin Mortensen, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni og verkætlanarleiðari, Bergur Berg, fulltrúi í Mentamálaráðnum, Petur Alberg Lamhauge, ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum, og Sjúrður Rasmussen, løgfrøðiligur ráðgevi á Løgmansskrivstovuni.

# 1. Landsfyrisitingin fram til umskipanina í 1997

## Løgtingsumsitingin

Løgtingið varð endurstovnað í 1852. Fyrstu nógvu árini var føroyska ávirkanin á lóggávuna mest óbeinleiðis. Løgtingið ummælti ymsar lógir, sum danski ríkisdagurin skuldi taka støðu til at seta í gildi. Í heilt fáum førum hevði Løgtingið heimild at áseta rættarreglur beinleiðis. Fyrisitingarmál, sum serstakt vórðu løgd til Løgtingið, og fyrisitingarmál, har hildið varð, at føroyingar skuldu hava ávirkan, vórðu eisini viðgjørd á tingi.

Tingseturnar vóru nakrar vikur hvørja ferð, vanliga var ein um heystið og ein um várið. Tingið hevði eingi starvsfólk, og millum seturnar avgreiddi amtmaðurin tingsins vegna mál, sum ikki kundu bíða, til komið varð saman aftur. Hesi mál vórðu síðan løgd fyri Løgtingið til góðkenningar eftir tilmæli frá Løgtingsins amtsmálanevnd.

Í 1928 varð sett millumtinganevnd – landsnevndin – við trimum tingmonnum, sum, tá ið tingið ikki var saman, skuldi taka sær av ymsum málum, sum tingið hevði beint nevndini, og skundmálum, sum amtmaðurin í ávísan mun áður hevði tikið sær av. Í fyrsta umfari vórðu sett tvey starvsfólk. Nevndin leigaði seg inn í hølini hjá Telefonverkinum á Bryggjubakka, har útvarpið seinni helt til.

Í 1939 varð avgjørt at seta á stovn eina løgtingsskrivstovu við skrivstovustjóra, Edward Mitens. Skrivstovan helt til í somu hølum sum landsnevndin á Bryggjubakka, seinni hjá Lützen á Áarvegnum. Á skrivstovuni starvaðust eisini ein fulltrúi og trý skrivstovufólk. Sama ár varð eisini stovnsett skrivstova fyri øllum fíggjarviðurskiftum hjá landinum, Færøernes Oppebørselskontor. Hetta ár varð eisini settur ein løgtingsverkfrøðingur, Harry Fonsdal.

Við hesum hevði Løgtingið fyrisitingarliga skipað seg við eini fyrisitingareind, eini fíggjareind og eini tekniskari eind. Hesar tríggjar eindir hava verið berandi eindir í Føroyum líka síðan. Økini, sum vóru serliga umfatandi fyrisitingarliga, vóru telefonverkið, kommunala eftirlitið og Dronning Alexandrines hospital saman við hinum sjúkrahúsunum í landinum.

Kríggið gjørdi, at størri trýst varð lagt á fyrisitingina í Føroyum, og av tí at sambandið við Danmark varð kvett, máttu ymsar bráðfeingis fyrisitingarligar skipanir setast á stovn. Størsti parturin av hesum skipanum varð tó lagdur hjá amtmanninum. Minni parturin varð lagdur hjá løgtingsfyrisitingini.

## Landsskrivstovan

Í 1948 varð heimastýrisskipanin stovnað. Løgtingið fekk, umframt tær fyrisitingarligu heimildirnar, tað hevði havt higartil, eisini lóggávuvald í yvirtiknum málum. Landsstýrið varð sett at taka sær av fyrisitingini og setti á stovn eina landsskrivstovu, sum yvirtók virksemið hjá Løgtingsskrivstovuni. Sum skrivstovustjóri varð settur Johan Djurhuus. Landsskrivstovan og Landsstýrið leigaðu Bakkapakkhúsið úti á Tinganesi frá Tryggingarsambandinum.

Um sama mundið var landsverkfrøðingsskrivstova við Mikkjali Helmsdal sum landsverkfrøðingi sett á stovn. Eisini skifti Færøernes Oppebørselskontor navn til Føroya gjaldstovu, sum framvegis tók sær av øllum fíggjarviðurskiftum landsins.

Skipanin var nú tann, at undir Landsstýrinum vóru tvey departement: Landsskrivstovan og Landsverkfrøðingurin, sum virkaðu óheft av hvørjum øðrum mótvegis Landsstýrinum. Allir vanligir fyrisiting-

arligir spurningar og stovnar vóru undir Landsskrivstovuni, og allir tekniskir spurningar, vegir, bygningar og havnir vóru undir Landsverkfrøðinginum.

Málsøkini, sum vórðu yvirtikin, vóru í flestu førum ikki fyrisitingarliga krevjandi. Mál av serligum týdningi vóru skattamál, ávís undirvísingarøki (ikki fólkaskúlin), kommunumál, ymiskar løgtingsjáttanir, fiskivinnumál, djóralæknamál, apotekaramál, bókasøvn, byggimál og handilsmál. Sum áður tók landið sær eisini í ávísan mun av sjúkrahúsunum og telefonverkinum. Í 1956 kom eitt stórt øki afturat, yvirtøkan av kongsjørðini. Skrivstovan hjá Jarðarráðnum varð sett at taka sær av hesum øki.

Tingmenn tóku sær í stóran mun av umsitingini í Løgtinginum sjálvur. Tó hjálpti Landsskrivstovan við at skriva lógaruppskot, veitti í ávísan mun hjálp á tingfundum, vegleiddi tingnevndir og tingmenn, gav út Løgtingstíðindi og avgreiddi endaliga samtykt tingmál. Landsverkfrøðingurin tók sær av umsitingini hjá vega- og havnanevndini hjá Løgtinginum.

Skipanin á Landsskrivstovuni var einføld. Ein stjóri, nakrir fulltrúar og nøkur skrivstovufólk. Fulltrúarnir vóru ikki nógvir í tali. Fyrst í 50'unum tríggir og seinast í 70'unum einir tíggju, og umleið tað tvífalda av skrivstovufólkum. Stjórin býtti út innkomnar uppgávur ímillum fulltrúarnar, sum málsviðgjørdu. Stjórin undirskrivaði sjálvur allan post, sum fór úr húsinum. Harafturat var hann skrivari á landsstýrisfundum. Skrivstovufólkini høvdu so at siga onga málsviðgerð. Bert arbeiði við at skriva, kopiera, skráseta og annað vanligt skrivstovuarbeiði, alt eftir nærri boðum frá fulltrúunum.

Listin yvir málsøkini, sum fulltrúarnir skuldu arbeiða við, varð javnan dagførdur og samsvaraði ikki altíð við listan hjá landsstýrismonnunum. Tað var sera vanligt, at fulltrúar høvdu málsøki hjá fleiri landsstýrismonnum, og hetta var ofta ónøgd við, tí landsstýrismenn vildu hava fulltrúarnar at brúka orkuna til síni málsøki.

Í 1957 og 1958 ognar Landsstýrið sær frá Tryggingarsambandinum og øðrum privatum flestu ognirnar, sum landið í dag eigur í Tinganesi. So við og við varð flutt í tær. Løgmaður og landsstýrismenn fingu skrivstovu í Skansapakkhúsinum miðskeiðis í 60'unum.

Í 1960 verður á fyrsta sinni gjørd ein uttanhýsis meting av skrivstovugongdini á Landsskrivstovuni og Gjaldstovuni. Ein maður frá Forvaltningsnævnets sekretariat í Danmark fylgdi arbeiðinum í tríggjar vikur og kom við tilráðingum. Høvuðsboðskapurin var í størri mun at brúka nýggj skrivstovuamboð so sum stenslar og standardskriv. Eisini varð mælt til einfaldari mannagongd til at ávísa pening úr landskassanum

Í 1975 var gjøllig uttanhýsis kanning gjørd av landsfyrisitingini av Páll Narve A/S í Rødovre. Hon snúði seg serliga um roknskaparviðurskifti landsins og í størri mun at leggja um til EDV.

## Trýstið á Landsskrivstovuna økist

Í árunum 1976-78 hendi ein munandi broyting í føroysku fyrisitingini, orsakað av at málsøki í Danmark vórðu løgd út til amt og kommunur. Fyrisitingin av skúlamálum, almannamálum og sjúkrahúsmálum varð løgd undir Landsstýrið. Postverkið varð eisini yvirtikið. Sosiala deild hjá Ríkisumboðnum gjørdist til Almannastovuna, Landsskolekonsulenten gjørdist til Landsskúlafyrisitingina, og stovnsett varð ein sjúkrahússtjóraskrivstova. At hesi stóru øki vórðu yvirtikin eftir § 9 í heimastýrislógini, sást aftur í játtanini til nevndu stovnar, men fyrisitingin á Landsskrivstovuni fekk nærum ongan fyrisitingarligan styrk.

Um sama mundið gjørdist vanligari at skipa ymisk øki við lóg og at leggja fyrisitingarligar heimildir til Landsstýrið. Tað almenna fór eisini í nógv størri mun at veita fiskivinnu og aðrari vinnu studning og veðhøld, eins og tað varð vanligt við lóg at leggja heimildir til Landsstýrið saman við løgtingsnevnd.

Trýstið gjørdist tí sera stórt á Landsskrivstovuna fyrst í 80'unum, og ikki var óvanligt at hoyra millum fólk, at ongantíð fekst svar úr Tinganesi um eitthvørt, søkt hevði verið um.

Í 70'unum varð Landsskrivstovan umskipað. Ein skrivstovustjóri, síðustillaður verandi skrivstovustjóra, varð settur at taka sær av fiskivinnu- og uttanlandsmálum. Fyrst kom Einar Kallsberg í starvið, Árni Olafsson avloysti hann, og síðan varð Kjartan Hoydal settur í hetta starv.

Í 1987 varð løgtingsumsitingin skild burtur frá Landsskrivstovuni, og stovnað varð serlig løgtingsskrivstova við Kristoffer Thomassen sum stjóra. Á skrivstovuni vórðu sett fýra skrivstovufólk, seinni vórðu eisini fulltrúar settir. Øll tænasta til tingmenn og tingnevndir varð nú løgd til hesa skrivstovu. Ávíst beinleiðis samskifti var tó framvegis millum tingnevndir og Landsskrivstovuna.

Fýra framkomin tekstviðgerðartól vórðu útvegað miðskeiðis í 80'unum, og skrivstovufólk vórðu upplærd til at nýta tey. Tað var ikki fyrr enn komið var langt inn í 90'ini, at hvør persónur fekk sína teldu og dugdi at fáast við vanlig tekstviðgerðarforrit.

Í 1987 fór Johan Djurhuus frá sum skrivstovustjóri fyri aldur. Farið varð nú undir at umskipa virksemið hjá Landsskrivstovuni. Fyritøkan Jens Bisballe planlægning var biðin at ráðgeva. Serliga varð umhugsað ein deildarskipan á Landsskrivstovuni, ein nýggj uppseting av fíggjarlógini, og hvussu kunningartøkni best kundi nýtast í landsfyrisitingini. Í 1989 varð nýggj skipan sett í verk við hesum deildum: Fiski- og onnur vinnudeild, fíggjardeild, almanna- og heilsudeild, lógardeild, samskiftisdeild og skúla- og mentanardeild. Harumframt var ein fyrstistjóri við eini lønar- og starvsfólkadeild undir sær. Á uttanríkisøkinum og kunningarøkinum vóru eisini tvær eindir, sum tó ikki vóru skipaðar sum deildir. Jalgrím Hilduberg var forstjóri.

Í 1994 varð samtykt nýggj stýrisskipanarlóg. Størsta broytingin var, at vit í 1996 fingu landsstýrismannaábyrgd, og at tað varð gjørt púra greitt, at Løgtingið einki skuldi hava við fyrisitingina at gera. Løgtingið var lóggávuvald, og Landsstýrið kundi ikki sita, hevði tað ein meiriluta á tingi ímóti sær. Broytingin gjørdi, at har fyrisitingarvaldið fyrr hevði ligið hjá Landsstýrinum og eini løgtingsnevnd í felag, hevði Landsstýrið nú valdið einsamalt, og landsstýrismenn tóku fyrisitingarligar avgerðir hvør einsæris. Mál skuldu nú bara á landsstýrisfund, tá ið tingmál skuldu fyrireikast, ella tá ið samskipandi viðurskifti millum landsstýrismenninar gjørdu tað neyðugt.

Hildið varð, at nýggja stýrisskipanin kravdi eina umskipan av fyrisitingini. Boð vórðu send eftir skrivstovustjóra í danska uttanríkisráðnum, Finn Normann Christensen, sum varð settur sum forstjóri í eitt gott ár at skipa ein nýggjan bygnað fyri fyrisitingina.

# 2. Umskipanin í 1996-1997

20. mars 1996 legði Finn Normann Christensen fram uppskot um nýskipan av landsfyrisitingini. Endamálið við nýskipanini varð lýst soleiðis:

- At skapa sterkari fyrisitingarligar eindir
- At skapa hóskandi karmar fyri framhaldandi rationalisering av almenna geiranum
- At skapa grundarlag fyri tryggum arbeiðsgongdum gjøgnum eitt greitt myndugleikabýti og styrkta samskipan
- At skapa møguleikar fyri, at fyrisitingin kann røkja sínar uppgávur á ein kostnaðareffektivan hátt

Eisini varð sagt um endamálið:
*„udvikle forvaltningen til effektivt at betjene politikere og borgere. Forvaltningenn skal være fagligt velfunderet og være i stand til at yde effektiv indsats med høj produktivitet. Målet er at øge forvaltningens anseelse hos politikerne og befolkningen og samtidig at hæve de offentlig ansattes selvrespekt ved at varetage de offentlige opgaver på en retsikker og offentlig måde.“*

Amboðini at røkka omanfyristandandi málum vóru:

- Broyttur bygnaður
- Mannagongdir fyri at leggja mál fyri landsstýrisfund
- Mannagongdir fyri at leggja mál fyri landsstýrisfólk
- Skipan av einum kærustovni
- Skipan av starvsfólkapolitikki fyri landsfyrisitingina
- Skipan av kunningarpolitikki

Bygnaðurin skuldi skipast í seks aðalstýrir (generaldirektorat):

- Løgmansskrivstovu
- Fíggjarmálastýri
- Veiðimálastýri
- Vinnumálastýri
- Mentamálastýri
- Heilsumálastýri

Aðalstýrini skuldu skipast við at leggja deildir á Landsskrivstovuni saman við viðkomandi stovnum ella stovnspørtum. Sostatt var ætlanin, at aðalstýrini umframt at røkja stjórnarráðsuppgávur sum lógarsmíð og yvirskipaða stýring av málsøkjunum, eisini skuldu taka sær av ávísum stovnsuppgávum sum málsviðgerð og rakstri av málsøkjum. Grundgevingin var, at eitt land við so avmarkaðum tilfeingi illa hevði ráð at skipa sjálvstøðug, vælvirkandi stjórnarráð (departement). Mett varð eisini, at sum frá leið fór nýggi bygnaðurin at skapa grundarlag fyri týðandi rationaliseringum, betri samskipan og sterkari fakligum umhvørvi. Ein fyritreyt var, at skipað vórðu stjórastørv fyri alt ábyrgdarøkið hjá aðalstýrunum.

### Verksetingin og broytingar fram til dagin í dag

Árini 1996-97 vórðu bygnaðarbroytingarnar framdar í verki. Fyrst varð ein løgmansstjóri settur at standa fyri íverksetanini og síðan fimm aðalstjórar, ið fingu til uppgávu at skipa einstøku aðalstýrini.

Stýrini vórðu skipað á henda hátt:
- **Løgmansskrivstovan:** Varð skipað við Lógardeildini og tveimum nýggjum deildum, Nýskipanardeild og Uttanlandsdeild.

- **Fíggjarmálastýrið:** Í staðin fyri at taka Toll- og skattstovu Føroya, Føroya gjaldstovu og Landsbanka Føroya inn í ráðið, sum skotið varð upp, varð avtalað við hesar stovnar at útinna ávísar uppgávur fyri aðalstýrið. Sum dømi kann nevnast, at avtalað var við Toll- og skattstovuna um at taka sær av skattalógaruppskotum og samráðingum um dupultskattaavtalur.

- **Veiðimálastýrið → Fiskimálastýrið:** Onnur vinna varð liðað burtur úr Deildini fyri fiski- og aðra vinnu og løgd saman við Fiskiveiðieftirlitinum og Lønjavningargrunninum í Fiskimálastýrinum.

- **Vinnumálastýrið:** Partur av Deildini fyri fiski- og aðra vinnu varð lagdur saman við Samskiftisdeildini í Tinganesi og Oljuumsitingini.

- **Mentamálastýrið → Undirvísingar- og mentamálastýrið:** Skúla- og mentanardeildin í Tinganesi og Landsskúlafyrisitingin vórðu løgd saman í nýggja aðalstýrið. Landsskúlafyrisitingin hevði áður útint bæði stjórnarráðsuppgávur og stovnsuppgávur.

- **Heilsumálastýrið → Almanna- og heilsumálastýrið:** Deildin fyri Almanna- og heilsu í Tinganesi varð løgd saman við Sjúkrahússtjóraembætinum og pørtum av bókhalds-, lønar- og starvsfólkafyrisitingini hjá Almannastovuni. Harafturat vórðu útgjaldingar av ávísum veitingum á Almannastovuni tiknar inn í aðalstýrið.

Sum nevnt var upprunaliga ætlanin, at aðalstýrini skuldu taka sær av summum stovnsuppgávum, umframt at tey skulu røkja stjórnarráðsuppgávur. Gongdin síðan hevur tó verið, at fleiri og fleiri stovnsuppgávur eru fluttar út aftur á stovnarnar. Sum dømi kunnu nevnast:

- **Fíggjarmálaráðið:** Landsarkitektur fluttur til Landsverk. Skattalættamál flutt til Kærustovnin.

- **Fiskimálaráðið:** Fiskiveiðieftirlitið gjørt til sjálvstøðugan stovn, sum síðan er skipaður í stovnin Vørn saman við MRCC, Tórshavnar Radio, Tilbúgvingarstovninum og Veðurtænastuni. Vørn tekur sær í dag partvíst av at avgreiða fiskiloyvi. Skipaskrásetingin er flutt til Sjóvinnustýrið, og Lønjavningarstovan er flutt til partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

- **Vinnumálaráðið:** Oljufyrisitingin fór í fyrstu atløgu í eitt serstakt oljumálaráð fyri síðan at verða flutt saman við jarðfrøðipartinum av Náttúrugripasavninum. Alifyrisitingin er eisini flutt út og er í dag á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

- **Mentamálaráðið:** Studni er gjørdur til sjálvstøðugan stovn. Fólkaskúlalærarasetanir eru lagdar til skúlastjórar.

- **Heilsumálaráðið:** Bókhalds- og roknskaparfyrisiting og lønar- og starvsfólkafyrisiting eru fluttar aftur til sjúkrahúsverkið. Umsiting av serviðgerð uttanlands flutt til Landssjúkrahúsið. Raksturin av kommunulæknaskipanini er fluttur til Heilsutrygd.

- **Almannamáláráðið:** Bókhalds- og roknskaparfyrisiting og lønar- og starvsfólkafyrisiting og útgjalding av ávísum almannaveitingum er fluttar aftur til Almannaverkið. Umsiting í sambandi við børn og ung, ið verða send av landinum, er flutt til Almannaverkið.

Eftir valið í 2002 varð heitið stýri broytt til ráð, eitt nú varð Vinnumálastýrið broytt til Vinnumáláráðið. Talið av stjórnarráðum hevur skift nakað. Lægsta talið er seks frá 1997-98. Hægsta talið er níggju í tíðarskeiðunum 2002-04 og 2008-11. Síðan 1997 er talið av stjórnarráðum broytt soleiðis:

| Ár | Samgonga | Tal av stjórnarráðum | Ráð stovnað/niðurløgd |
|---|---|---|---|
| 1997 | Sambandsflokkurin<br>Fólkaflokkurin<br>Sjálvstýrisflokkurin<br>Verkamannafylkingin | 6 | |
| 1998 | Fólkaflokkurin<br>Tjóðveldi<br>Sjálvstýrisflokkurin | 6 | Sjálvstýrismál sett á stovn undir LMS. |
| 1999 | Fólkaflokkurin<br>Tjóðveldi<br>Sjálvstýrisflokkurin | 6 → 7 | Oljumálastýrið sett á stovn. |
| 2002 | Fólkaflokkurin<br>Tjóðveldi<br>Sjálvstýrisflokkurin<br>Miðflokkurin | 7 → 9 | Løgmáláráð sett á stovn. Almanna- og heilsumáláráðið → Almannamáláráð og heilsumáláráð. |
| 2004 | Javnaðarflokkurin<br>Fólkaflokkurin<br>Sambandsflokkurin | 9 → 7 | Løgmáláráð → Innlendismáláráð. Almannamáláráð og heilsumáláráð → Almanna- og heilsumáláráðið. Oljumáláráðið avtikið. |
| 2008 | Javnaðarflokkurin<br>Tjóðveldi<br>Miðflokkurin | 7 → 8 | Uttanríkisráð sett á stovn. |
| 2008 | Sambandsflokkurin<br>Fólkaflokkurin<br>Javnaðarflokkurin | 8 → 9 | Almanna- og heilsumáláráðið → Almannamáláráð og heilsumáláráð. |
| 2011 | Sambandsflokkurin<br>Javnaðarflokkurin | 9 | |
| 2011 | Sambandsflokkurin<br>Fólkaflokkurin<br>Sjálvstýrisflokkurin<br>Miðflokkurin | 9 → 8 | Uttanríkisráðið niðurlagt. |
| 2013 | Sambandsflokkurin<br>Fólkaflokkurin<br>Miðflokkurin | 8 → 7 | Innlendismáláráðið niðurlagt |

# 3. Stjórnarráðini í dag

Niðanfyri er ein lýsing av stjórnarráðunum í dag, men fyrst eitt sindur um samlaða almenna geiran. Hóast landsfyrisitingin ikki beinleiðis varar av stovnum, nevndum, kommunum o.ø., so hevur hon yvirskipaða ábyrgd av samlaða almenna geiranum.

### Almenna nýtslan í 2001 og 2011:

| Rakstrarkostnaður í mió. kr. | | | Prosent av BTÚ | |
|---|---|---|---|---|
| | 2001 | 2011 | 2001 | 2011 |
| Land | 1.712 | 2.834 | 17,8 | 21,4 |
| Kommunur | 519 | 999 | 5,4 | 7,5 |
| Samhaldsfasti, ALS o.tíl. | 106 | 181 | 1,1 | 1,4 |
| Ríkisfyrisiting | 106 | 161 | 1,1 | 1,2 |
| Til samans | 2.443 | 4.175 | 25,4 | 31,5 |
| Stjórnarráð | 85 | 120 | 0,9 | 0,9 |
| **BTÚ** | **9.612** | **13.254** | | |

*Viðm: Almenna nýtslan fevnir um stovnsrakstur. Veitingar til einstaklingar og verkløg eru ikki við í hesum tølum. 10-ára skeiðið 2001-2011 er valt, tí seinasti endaliga uppgjørdi tjóðarroknskapurin er fyri 2011.*

Talvan omanfyri vísir ein lutfalsliga stóran vøkstur í almennu nýtsluni, mált í prosentum av bruttotjóðarúrtøkuni. Í 2001 var almenna nýtslan 25,4 % av BTÚ. Í 2011 var hon 31,5 % av BTÚ. Stjórnarráðini vóru 0,9 % av almennu nýtsluni bæði árini. Her skal havast í huga, at stór málsøki sum tilbúgving, fólkakirkja, revsirættur, fíggjarrættur, vinnurættur og loðslógin eru yvirtikin í tíðarskeiðinum. Eisini eru málsøki flutt inn og út úr stjórnarráðum í tíðarskeiðinum. T.d. vórðu oljumál skipað í egið stjórnarráð í 2001. Í 2011 lógu tey hjá Jarðfeingi.

### Rakstrarkostnaður av stjórnarráðunum í 2013

Landsfyrisitingin er í dag skipað við Løgmansskrivstovuni og seks stjórnarráðum. Fylgiskjølini 1 til 7 vísa ábyrgdarøki, bygnað og tilvísandi stovnar.

Í 2013 kostaði raksturin av stjórnarráðunum 124 mió. kr. Av teimum fóru 93 mió. kr. til lønir, og 31 mió. kr. til annan rakstur. Raksturin av stjórnarráðunum svaraði til 2,6 % av samlaðu útreiðslunum á løgtingsfíggjarlógini fyri 2013. Hvussu rakstrarkostnaðurin var býttur millum einstøku stjórnarráðini, sæst á talvuni niðanfyri.

| Stjórnarráð | Lønir | Annar rakstur | Til samans |
|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan*) | 23 | 9 | 32 |
| Fíggjarmálaráðið | 8 | 2 | 10 |
| Fiskimálaráðið | 9 | 4 | 13 |
| Vinnumálaráðið | 8 | 1 | 9 |
| Mentamálaráðið**) | 14 | 3 | 17 |
| Heilsumálaráðið***) | 12 | 7 | 19 |
| Almannamálaráðið | 10 | 3 | 13 |
| Innlendismálaráðið | 9 | 2 | 11 |
| Samanlagt | 93 | 31 | 124 |

*) Sendistovurnar eru við, **) Próvstovan og Yrkisdepilin eru við, ***) Talgilda Heilsuskipanin er við

## Dagliga fyrisitingin

Løgmaður býtir málsøkini millum landsstýrisfólkini. Hetta verður gjørt grundað á eina neyva greining av øllum málsøkjum. Galdandi býti av málsøkjum er lýst í kunngerð nr. 148 frá 14. nov. 2011, seinast broytt við fráboðan nr. 121 frá 23. okt. 2013.

Arbeiðið hjá landsfyrisitingini er grundað á virðir, missión og visión, ið vórðu orðað í 2005, (sí fylgiskjal 9).

Politiska og fyrisitingarliga virksemið í landsfyrisitingini verður samskipað av Løgmansskrivstovuni. Mannagongdir eru orðaðar fyri, hvussu mál skulu leggjast fyri landsstýrisfund. Reglur eru bæði viðvíkjandi formi, innihaldi og tíðarfreistum. Áðrenn mál verða løgd fyri landsstýrisfund, verða tey løgd fyri ein stjóraráðsfund. Á stjóraráðsfundinum verður skráin fyri landsstýrisfundin gjøgnumgingin.

Tá nýggj samgonga er stovnað, verður samgonguskjalið greinað fyri at staðfesta, hvat stjórnarráð hevur ábyrgdina av at útinna ymsu málini, og hvørji onnur ráð eiga at vera partur av fyrireikingini ella eiga at verða kunnað. Tvær ferðir um árið lata stjórnarráðini Løgmansskrivstovuni frágreiðing um, hvussu gongst at útinna ætlanirnar í samgonguskjalinum.

Tað eru ikki, sum skotið varð upp undir umskipanini, gjørdar mannagongdir fyri, hvussu mál skulu leggjast fyri landsstýrisfólkini.

Fíggjarlógararbeiðið verður samskipað av Fíggjarmálaráðnum samsvarandi játtanarlóg, kunngerðum og rundskrivi. Tá Landsstýrið varð skipað við landsstýrismannaábyrgd, varð uppsetingin av løgtingsfíggjarlógini broytt, soleiðis at settar vórðu upp greinar, sum vístu ábyrgdarbýtið millum landsstýrisfólkini. Grundarlagið fyri praktiska arbeiðinum eru ein leiðslukunningarskipan og ein budgettskipan. Leiðslukunningarskipanin gevur upplýsingar um allar kontur á fíggjarlógini, her undir søguligu gongdina. Budgettskipanin skapar fortreytir fyri fíggjarlógararbeiðinum úti í einstøku stjórnarráðunum.

Lønar- og starvsfólkaviðurskifti verða samskipað av Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum. Lønardeildin samráðist við fakfeløg vegna allan almenna geiran. Eisini vegleiðir og ráðgevur deildin øllum almenna geiranum í lønar og starvsfólka-

spurningum, flokkar størv og góðkennir serstakar treytir. Lønardeildin varar eisini av felags starvsfólkapolitikkinum fyri landsfyrisitingina, sum Løgmansskrivstovan orðaði í tíðarskeiðinum 1997 til 2000.

Búskaparskipan landsins er ein bókhalds- og roknskaparskipan, sum øll ráð og flestallir stovnar brúka. Eisini rapportera kommunurnar mánaðarliga til hesa skipan. Arbeitt verður somuleiðis við at fáa sosialar grunnar sum Samhaldsfasta eftirlønargrunnin og ALS at rapportera mánaðarliga til hesa skipan. Hervið fæst leypandi innlit í allan tann almenna búskapin. Skipanin verður umsitin av Føroya gjaldstovu.

Byggivirksemi og viðlíkahald av almennum bygningum er í ávísan mun savnað hjá Landsverki, sum í løtuni er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Somuleiðis umsitur Landsverk almenn leigumál.

Skipað er ein felags KT-fyrisiting, ið varar av KT-undirstøðukervinum fyri øll stjórnarráð og eina røð av stovnum.

Løgmansskrivstovan hevur skipað eina felags telefonmóttøku saman við Vinnumálaráðnum, Fiskimálaráðnum og Mentamálaráðnum.

## Stovnsuppgávur í stjórnarráðum

Tað er sera ymiskt, hvat er eftir av stovnsuppgávum í stjórnarráðunum. Nevnast kunnu:

**Løgmansskrivstovan:** Ongar beinleiðis stovnsuppgávur, tó høvdu uppgávur sum útflutningsframi og menningarsamstarv kunnað verið røktar av einum stovni.
**Fíggjarmálaráðið:** Lønarmál.
**Vinnumálaráðið:** Ongar stovnsuppgávur eru í Vinnumálaráðnum.
**Fiskimálaráðið:** Umsiting av fiskiloyvum og royndarloyvum.
**Mentamálaráðið:** Viðvíkjandi fólkaskúlanum fer meginparturin av orkuni til rakstur. Viðvíkjandi miðnámsskúlunum fer um helvtin av orkuni til rakstur.
**Heilsumálaráðið:** Umsiting av Talgildu heilsuskipanini (THS).
**Almannamálaráðið:** Ávísar stuðulsjáttanir.

## Kæruskipan

Seinast í 90'unum vórðu grundleggjandi broytingar gjørdar í kæruskipanini. Føroya kærustovnur varð settur á stovn. Møguleikin at kæra til landsstýrismannin varð tikin av á flestøllum økjum, og kærunevndir vórðu skipaðar í staðin.

Føroya kærustovnur er í dag skrivstova hjá hesum nevndum:

- Kærunevndini í almanna- og heilsumálum
- Skatta- og avgjaldskærunevndini
- Kærunevndini í lendismálum
- Kærunevndini hjá Studna
- Vinnukærunevndini
- Psykiatrisku sjúklingakærunevndini
- Fjølmiðlanevndini
- Skuldarumskipanarnevndini

Umframt vanliga kærurættin millum undir- og yvirskipaðan myndugleika, eru her dømir um, at stjórnarráðini framvegis eru kærumyndugleiki:

**Fiskimálaráðið:** Kærur um fiskiloyvi, tilbúgving og partvíst umhvørvi og landbúnað.
**Mentamálaráðið:** Kærur um próvtøkur.
**Almannamálaráðið:** Kærur um fíggjarligt frípláss.
**Vinnumálaráðið:** Partar av kæruviðgerðum á sjóvinnuøkinum.

## Eftirlitsstovnar:

Seinastu árini eru eftirlitsstovnarnir vorðnir fleiri, og virksemið er vorðið neyvari. Virksemið hjá Landsgrannskoðanini er víðkað

til at fevna um fyrisitingarligt eftirlit, eftirlit við telduskipanum o.ø., umframt eftirlitið við roknskapum.

Við stýrisskipanarlógini vórðu tvey nýggj eftirlitslið sett á stovn: landsstýrismálanevnd og møguleikin at seta kanningarstjóra. Í 2001 varð Løgtingsins umboðsmaður settur á stovn. Harafturat er nú møguligt hjá løgtingsnevndum at kalla landsstýrisfólk til samráð í løgtingsnevnd. Nýggir og skjótari møguleikar hjá tinginum at seta fyrispurningar eru komnir í lag – munnligir fyrispurningar og § 52a-fyrispurningar.

## Starvsfólk

Í november 2013 vóru 146,2 ársverk í stjórnarráðunum. 26 leiðarar, 81,5 fulltrúar o.o. og 39 skrivstovufólk o.o. Býtið millum leiðslu, fulltrúar og skrivstovufólk er, at 18% eru leiðarar, 56 % eru fulltrúar og 26 % eru skrivstovufólk. Til samanberingar kann nevnast, at tá Løgmansskrivstovan í 2005 gjørdi eina lýsing av landsfyrisitingini, var býtið, at 18 % vóru leiðarar, 45 % vóru fulltrúar og 37 % vóru skrivstovufólk.

Hvussu ársverkini eru býtt millum ráðini, sæst her:

Yvirlit yvir samlaða starvsfólkatalið í stjórnarráðunum hevur ikki verið gjørt á hvørjum ári. Til samanberingar kann tó sigast, at í 1998 vóru 108 ársverk í stjórnarráðunum. Í 2001 vóru 172 ársverk, í 2005 vóru 138 ársverk, og í 2011 vóru 163 ársverk.

Hvussu nógv nýggj størv eru komin afturat, síðan stjórnarráðini vórðu sett á stovn, er trupult at gera upp. Orsøkin er partvíst, at stórur partur av størvunum í aðalstýrunum ikki vóru nýggj størv, men starvsfólk, sum vóru flutt úr deildum á Landsskrivstovuni og stovnum inn í aðalstýrini. Orsøkin er partvíst eisini, at málsøki eru flutt inn og út úr stjórnarráðum í hesum tíðarskeiði t.d. varð SamVit við 17 starvsfólkum lagt undir Uttanríkisráðið í 2009.

Talvan á næstu síðu er yvirlit yvir starvsfólk við longri útbúgvingum í stjórnarráðunum í november 2013. Undir búskaparfrøðingum eru cand. polit, cand.oecon og cand.merc, undir stjórnmálafrøðingum eru cand.scient. pol, cand.scient.adm o.o., undir øðrum eru m.a. útbúgvingar, sum eru knýttar at fakligu eyðkennunum í serstøku stjórnarráðunum, t.d. fiskivinnukandidatar í Fiskimálaráðnum og master í heilsuinformatikk í Heilsumálaráðnum.

| Stjórnarráð | Leiðarar | Fulltrúar o.o | Skrivstovufólk o.o. | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan*) | 5 | 15,7 | 9 | 29,7 |
| Fíggjarmálaráðið | 2 | 11 | 3 | 16 |
| Fiskimálaráðið | 4 | 9 | 5,2 | 18,2 |
| Vinnumálaráðið | 1 | 9,3 | 2 | 12,3 |
| Mentamálaráðið**) | 5 | 16,5 | 10,2 | 31,7 |
| Heilsumálaráðið***) | 5 | 10 | 5 | 20 |
| Almannamálaráðið | 4 | 10 | 4,3 | 18,3 |
| Samanlagt | 26 | 81,5 | 38,7 | 146,2 |

*)9 starvsfólk á sendistovunum eru ikki við, **)Yrkisdepilin og Próvstovan eru við, ***)Talgilda Heilsuskipanin er við.

| Stjórnarráð | Løgfrøðingar | Búskaparfrøðingar o.o | Stjórnmálafrøðingar o.o. | Onnur |
|---|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 6 | 1 | 4 | 10 |
| Fíggjarmálaráðið | | 10 | 3 | |
| Fiskimálaráðið | 4 | 1 | 2 | 6 |
| Vinnumálaráðið | 4 | 2 | 3 | 1 |
| Mentamálaráðið | 2 | 4 | 2 | 13,5 |
| Heilsumálaráðið | 2 | 5 | 3 | 5 |
| Almannamálaráðið | 5 | 3 | 6 | |
| **Samanlagt** | **23** | **26** | **23** | **35,5** |

## Vavið á uppgávum

Tað finst eingin greining, ið lýsir vavið á uppgávum og framleiðsluna hjá stjórnarráðunum. Av tí at talan er um almenna fyrisiting og ikki um privatfyritøku, er yvirhøvur sera trupult at gera hetta upp.

Fylgiskjølini 1 til 7 siga tó nakað um málið. Har er lýst, hvør játtanin er til ávikavist málsøki og stjórnarráð og hvørjir stovnar vísa til hvørt stjórnarráð. Eisini eru lýsingar av uppgávunum og bygnaðinum í stjórnarráðunum.

Tað eru 62 stovnar, sum vísa beinleiðis til stjórnarráðini. Hóast m.a. Fólkaskúlin, Almannaverkið og musikkskúlarnir eru skipað í nógvar eindir, telja hesir fyri eina eind í uppteljingini. Tað eru um 5.100 ársverk í stovnunum, sum vísa til stjórnarráðini.

Stjórnarráðini hava fyrisitingarheimild í 451 lógum. Tað vil siga, at í miðal eru 5-6 lógir við fyrisitingarheimild fyri hvønn fulltrúa.

Sambært protokollini hjá Løgmansskrivstovuni vóru í tíðarskeiðinum frá ólavsøku 2011 til februar 2014 fyri á politiskum landsstýrisfundi: 240 lógaruppskot, 200 kunngerðir, 149 upprit, 18 ríkislógartilmæli og 5 uppskot til samtyktar.

Í sama tíðarskeiði vórðu svaraðir 112 skrivligir fyrispurningar, 126 § 52a-fyrispurningar og 328 munnligir fyrispurningar úr Løgtinginum. Aftur at hesum koma ófráboðaðir fyrispurningar.

Harafturat verða gjørdar nógvar greiningar og álit. Á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni er eitt yvirlit yvir álitini. Onki yvirlit er yvir onnur sløg av greiningum.

## Hvussu arbeiðsorkan verður nýtt

Fyri at fáa eina ábending um, hvar arbeiðsorkan verður brúkt í stjórnarráðunum, hevur arbeiðsbólkurin biðið leiðslu og starvsfólk í landsfyrisitingini meta um, á hvørjum økjum, tey brúka sína orku. Lítið hevur verið gjørt við at skráseta slíkt, so talan kann einans vera um eina meting. Av tí at øll starvsfólkini hava svarað, og av tí at munirnir millum stjórnarráðini samsvaraðu við tað, sum arbeiðsbólkurin hevði væntað, skuldi metingin tó givið eina metingin tó góða ábending um orkunýtsluna í stjórnarráðunum.

Skilað varð ímillum politiskar uppgávur, fyrisitingarligar uppgávur og rakstraruppgávur. Fylgiskjal 8 vísir yvirlit yvir uppgávurnar, orkuna, sum varð nýtt til teirra, og hvat orkan svarar til í mun til tal av starvsfólkum.

Uppgávur av politiskum slag fevndu um: Politikkfyrireikandi arbeiði so sum greiningar, frágreiðingar og álit, lógarfyrireikandi arbeiði og lógarsmíð, politiska ráðgeving og aðrar landsstýris-

mannatænandi uppgávur, arbeiði við játtanarkørmum og fíggjarlóg, samskifti við Løgtingið (munnligir og skrivligir fyrispurningar o.a.) kunning og millumtjóða samstarv.

Uppgávur av fyrisitingarligum slag fevndu um: Generella málsviðgerð so sum svar til Landsgrannskoðanina, Umboðsmannin, innlitsumbønir o.a., málsviðgerð og samskifti við borgarar, fyritøkur o.s.fr., kæruviðgerð, samskifti og samskipan við undirskipaðar stovnar og kommunur.

Uppgávur av rakstrarligum slag fevndu um: Leiðslu, starvsfólkamál og HR-fíggjarstýring og bókhald (inni í stjórnarráðnum), KT, skráseting, viðlíkahald og reingerð, móttøku, avgreiðslu o.a.

**Prosentbýtið av arbeiðsorkuni hjá leiðslu og starvsfólki í øllum stjórnarráðunum**

| | |
|---|---|
| Politikkur | 46 |
| Fyrisiting | 24 |
| Rakstur | 30 |
| Í alt | 100 |

Metingin vísir, at 46 % av arbeiðsorkuni vórðu brúkt til politiskar uppgávur, 24 % til fyrisitingarligar uppgávur, og 30 % til rakstraruppgávur.

Metingin vísir, at arbeiðsorkan í stjórnarráðunum verður brúkt rættiliga ymiskt. Mentamálaráðið og Heilsumálaráðið brúka lutfalsliga minni orku til politiskar uppgávur enn hini ráðini. Orsøkin er, at Mentamálaráðið hevur nógva fyrisiting, serliga av fólkaskúlanum, og Heilsumálaráðið brúkar nógva orku til at reka Talgildu heilsuskipanina. Almannamálaráðið, Løgmansskrivstovan og Vinnumálaráðið brúka mest til politiskar uppgávur. Hetta kemst av, at munandi færri fyrisitingarligar uppgávur liggja hjá hesum ráðum.

**Prosentbýtið av arbeiðsorkuni hjá leiðslu og starvsfólki í einstøku stjórnarráðunum**

| Stjórnarráð | Politikkur | Fyrisiting | Rakstur |
|---|---|---|---|
| Løgmansskrivstovan | 55 | 15 | 31 |
| Fíggjarmálaráðið | 46 | 23 | 31 |
| Fiskimálaráðið | 47 | 27 | 26 |
| Vinnumálaráðið | 57 | 15 | 28 |
| Mentamálaráðið | 32 | 43 | 25 |
| Heilsumálaráðið | 38 | 13 | 49 |
| Almannamálaráðið | 58 | 19 | 23 |

# 4. Uppgávurnar hjá einum stjórnarráði

Í Føroyum eru sera fáar formligar ásetingar um kjarnuuppgávurnar hjá stjórnarráðunum og skyldurnar hjá embætisverkinum.

Tá Landsskrivstovan varð umskipað til aðalstýrir, varð eingin almenn lýsing gjørd av, hvør yvirskipaða uppgávan hjá einum aðalstýri skuldi vera, hvussu arbeiðsbýtið skuldi vera millum aðalstýrir og stovnar, ella hvørjar skyldur embætisverkið skuldi hava.

Hóast stjórnarráðini hava ógvuliga ymiskar uppgávur, er hesin partur ein roynd at orða eina yvirskipaða lýsing av kjarnuuppgávunum hjá einum stjórnarráði og av skyldunum hjá føroyska embætisverkinum.

Í Danmark er arbeiðsbýtið millum stjórnarráð og undirskipaðar stovnar ikki formliga skipað. Tað eru skyldurnar hjá embætisverkinum heldur ikki. Í Svøríki og Finnlandi eru hinvegin í størri mun orðaði formlig krøv um uppgávubýti og skyldur. Í Íslandi hava tey eftir fíggjarkreppuna eisini sett í gildi stjórnarlóg, ið m.a. ásetur skyldur hjá ráðharrum, stjórnarráðum, aðalstjórum og politiskum ráðgevum.

Í Danmark er leikluturin hjá embætisverkinum ikki nógv kannaður ella umrøddur. Orsøkin verður vanliga søgd at vera, at álitið á donsku miðfyrisitingina er gott, og at óformliga skipanin ikki hevur givið stórvegis trupulleikar. Ráðharrar og embætisfólk hava gjøgnum tíðirnar megnað at samst um eitt óformligt uppgávubýti, og formligar ásetingar hava tí ikki verið neyðugar. Orðaskiftið seinastu tíðina um danska embætisverkið bendir tó á, at álitið ikki er, sum tað hevur verið.

Sum so ofta hava Føroyar yvirtikið eina danska skipan uttan at viðgera nakað stórvegis, hvat vit vilja við henni. Í hesum føri hvønn leiklut, ið stjórnarráð og embætisverk skulu hava. Stóri munurin á skipanunum er, at danska fyrisitingin hevur mong hundrað ár á baki, har tann føroyska er sera ung, eisini aftur ímóti skipanum í øðrum Norðurlondum.

Javnan er kjak um støðd, leiklut og førleika hjá landsfyrisitingini. Tað er ikki ósannlíkt, at hetta er ein avleiðing av manglandi orðaskifti um, hvønn leiklut landsfyrisitingin skal hava í føroyska samfelagnum.

### Tingræði

Hvørki stýrisskipanarlógin ella lógin um ábyrgd Landsstýrisins nevna fyrisitingina við einum orði. Staðfestingarnar í hesum báðum lógum um, at Føroyar eru skipaðar sum fólkaræði við tingræði og landsstýrismannaábyrgd, siga tó óbeinleiðis nakað um uppgávur og skyldur hjá fyrisitingini.

Sum nevnt í undanfarna parti varð í 2005 orðað eitt felags virðisgrundarlag fyri landsfyrisitingina, ið varð soljóðandi: „Vit veita landsstýrinum ráð, tryggja haldgott grundarlag og gera hugskot til veruleika“. Hetta yvirskipaða tilverugrundarlag stendur við í dag. Aðrar ásetingar, sum siga nakað um yvirskipaðu uppgávuna og skyldurnar hjá embætisverkinum, eru t.d. fráboðan um málsøkjabýtið, sum býtir málsøkini millum stjórnarráðini; játtanarlógin við kunngerðum, sum ásetir mannagongdir fyri arbeiðinum við fíggjarlógarkørmum og fíggjarlóg; og fyrisitingarlógin og innlitslógin, sum áseta, hvussu almennir stovnar skulu handfara mál hjá borgarum.

Tingræði merkir, at fólkið velur tingið, t.e. løggevandi valdið, sum stendur til svars fyri veljaranum, tá val er. Síðan velur tingið løgmann, sum velur í minsta lagi tvey landsstýrisfólk. Løgmaður ger av, hvussu nógv landsstýrisfólk skulu vera, og hann ásetir arbeiðsbýtið teirra millum.

Í Føroyum hava vit sokallað negativt tingræði. Tað merkir, at løgmaður kann

verða sitandi, um hann ikki hevur meirilutan í Løgtinginum ímóti sær.

Gjøgnum tingið fáa løgmaður og landsstýrisfólk sostatt heimild frá fólkinum at útinna avgerðirnar hjá tinginum. Av somu orsøk hevur tingið skyldu til at hava eftirlit við virkseminum hjá Landsstýrinum.

Landsstýrisfólkini hava eina fyrisiting at hjálpa sær at fremja politisku ætlanirnar. Av tí at tað bert eru sjálv landsstýrisfólkini, sum gjøgnum tingið hava fingið heimild frá fólkinum at leiða landið, skal fyrisitingin arbeiða loyalt og óheft av persónligum sjónarmiðum. Hetta merkir m.a., at fyrisitingin innan fyri lógarinnar karmar skal virka fyri, at politisku ætlanirnar hjá landsstýrisfólkunum verða til veruleika. Harafturat skal fyrisitingin vera skipað soleiðis, at gjørligt er at staðfesta ábyrgd fyri at tryggja, at ábyrgdin í síðsta enda kann leiðast aftur til landsstýrisfólkini.

Í einari skipan við skiftandi politiskum leiðslum er tað harumframt ein týðandi uppgáva hjá fyrisitingini at tryggja stabilitet og samanhang.

## Landsstýrismannaábyrgd

Landsstýrismannaábyrgd merkir, at eitt landsstýrisfólk hevur ovastu politisku og rættarligu ábyrgdina av málsøki sínum og kann í høvuðsheitum taka allar avgerðir á økinum, um lógarheimild er til tess. Málsøkini eru tó so stór, at tað hvørki er gjørligt ella ráðiligt hjá einum landsstýrisfólki at taka allar avgerðir. Tí fær fyrisitingin alt oftari fulltrú til at umboða landsstýrisfólkið og til at taka avgerðir tess vegna.

Støddin á málsøkjunum merkir harafturat, at landsstýrisfólk hava tørv á ráðgeving frá embætisfólkum. Fyrisitingin skal tí vera fakliga sterk og hava gott lógarskil fyri at tryggja, at avgerðir verða tiknar á haldgóðum grundarlagi. Føroyar hava ikki siðvenju at seta politisk embætisfólk, og tí mugu serliga leiðslurnar í stjórnarráðunum hava førleika at ráðgeva landsstýrisfólkunum um politisk viðurskifti.

## Dagsins samfelag

Leikluturin hjá almennum myndugleikum er broyttur munandi í nýggjari tíð, bæði í Føroyum og grannalondum okkara. Fleiri og fleiri øki verða skipað við lóg, og tænasturnar hjá tí almenna verða alsamt fleiri. Krøvini til bæði politisku skipanina og fyrisitingina eru sera umfatandi og samansett, bæði frá borgarum, áhugafelagsskapum, altjóða samfelagnum o.s.fr.

Har leikluturin hjá embætisverkinum áður í størstan mun snúði seg um málsviðgerð og í avmarkaðan mun um lógarsmíð, so verða nú sett munandi meiri samansett krøv til fyrisitingina.

Alsamt størri tørvur er á at greina og gera uppskot til loysnir á stórum og torskildum samfelagsavbjóðingum, sum ganga tvørtur um málsøki. So hvørt sum lógarøkini gerast fleiri, veksur talið á markamótum millum teirra, og harvið veksur tørvurin á samskipan.

Fyri at vissa sær stuðul frá borgarunum til vælferðarsamfelagið og til fíggingina av tí, mugu politikarar og fyrisiting tryggja, at virksemi og tænastur verða rikin so dygt og effektivt sum gjørligt.

Av tí at so lítil samfelagsgransking er í Føroyum, og so fáir uttanhýsis partar sum eitt nú áhugafelagsskapir hava orku til at gera samfelagsgreiningar, má fyrisiting okkara í størri mun enn í grannalondunum taka sær av hesum greiningum sjálv.

Fjølmiðlalandslagið er broytt munandi, og fjølmiðlarnir eru alt oftari við til at seta politisku dagsskránna. Hetta setir krøv til fyrisitingina um at geva landsstýrisfólkunum skjóta og góða samskiftisráðgeving í áleikandi málum.

At eftirlitsstovnarnir eru vorðnir fleiri og virksemið neyvari setir eisini krøv til fyrisitingina, bæði í mun til mannagongdir

og í mun til at svara spurningum frá eftirlitstovnum og fyrispurningum úr Løgtinginum.

Skulu embætisfólk kunna røkja hesar ymiskligu og samansettu uppgávur, krevst neyv planlegging og raðfesting. Harafturat krevst eitt smidligt undirstøðukervi og eitt gott arbeiðsbýti, so at starvsfólk hava bestu umstøður at greiða setning sín.

## Arbeiðsbýtið millum stjórnarráð og stovnar

Sum lýst í undanfarna parti hevur gongdin í Føroyum eins og í grannalondum verið, at stjórnarráðini alt oftari taka sær av yvirskipaðari stýring, málsøkismenning og lógarfyrireiking, og at vanlig málsviðgerð verður flutt til stovnar, sum vísa til stjórnarráðið.

Endamálið er at tryggja landsstýrisfólkunum betri arbeiðsnáðir, so orka og yvirlit er til at seta kósina fyri málsøkið. Eitt slíkt arbeiðsbýti kann harafturat hava við sær størri álit á, at málsviðgerðin er óheft av politiskum áhugamálum.

Hóast uppgávur verða fluttar til stovnar undir stjórnarráðunum, hava landsstýrisfólkini framvegis evstu politisku og fyrisitingarligu ábyrgdina, uttan so at annað er staðfest við lóg. Tí krevur eitt slíkt arbeiðsbýti neyva samskipan og gott samstarv millum stjórnarráð og stovnar. Stjórnarráðini skulu eisini hava eftirlit við, at stovnarnar verða væl riknir og at játtanin verður hildin.

Skal avmarkaða orkan í fyrisitingini brúkast skynsamt, mugu leiðslur í stjórnarráðum og stovnum vera tilvitaðar um, hvussu tær raðfesta og samskipa orkuna, og hvussu kunnleiki og førleiki verður sameindur, tá ið ætlanir skulu leggjast og mál skulu loysast.

## Hvørjar eru uppgávurnar hjá einum stjórnarráði?

Fyri at draga samanum, so er tað ábyrgdin hjá fyrisitingini at tryggja stabilitet og samanhang í eini skipan við skiftandi politiskum leiðslum. Fyrisitingin skal vera soleiðis háttað, at ábyrgdin kann staðfestast, og undirstøðukervið og arbeiðsbýtið skulu geva starvsfólkum góðar umstøður at røkja sínar uppgávur.

Hóast mongu og fjølbroyttu uppgávurnar hjá stjórnarráðunum á onkun hátt hanga saman, eru tær í høvuðsheitum tvíbýttar: At virka sum skrivstova og tænastueind hjá landsstýrisfólkum og at virka sum evsti fakligi myndugleiki. Sostatt er arbeiðsbólkurin samdur um gongdina, sum hevur verið seinastu árini, at stjórnarráðini eru farin frá upprunaliga bygnaðinum til at taka sær meira av ráðgeving av landsstýrisfólkum og teirri yvirskipaðu stýringini av málsøkjunum. Málsviðgerð og uppgávur, sum snúgva seg um rakstur av undirskipaðum stovnum, verða latnar stovnum at umsita.

# Í stuttum um uppgávurnar hjá stjórnarráðunum:

- *At virka sum skrivstova og tænastueind hjá landsstýrisfólkunum*
  - At veita landsstýrisfólkunum ráðgeving um løgfrøðiligar og fakligar spurningar, óheft av persónligum og politiskum sjónarmiðum. Harumframt skal serliga leiðslan kunna sparra um politisk viðurskifti.
  - At ráðgeva um samskifti í áleikandi málum.

- *At virka sum evsti fakligi myndugleiki á málsøkjunum*
  - *At virka fyri, at politisku ætlanirnar hjá sitandi landsstýrisfólkum verða til veruleika*
    - Í samstarvi við viðkomandi stovnar, stjórnarráð og uttanhýsis partar at gera greiningar, orða politikkir á málsøkjunum og tryggja íverksetan.
    - Í samstarvi við viðkomandi stovnar, stjórnarráð og uttanhýsis partar at fyrireika og skriva lógaruppskot og at tryggja, at lógirnar verða íverksettar og eftirmettar.
  - *At taka sær av teirri yvirskipaðu stýringini og menningini av málsøkjunum*
    - At hava vælvirkandi samskifti, samskipan og ráðgeving við stovnarnar á málsøkjunum.
    - At hava eftirlit við stovnunum á málsøkjunum.
    - Støðugt at tryggja, at alment virksemi verður rikið so dygt og effektivt sum gjørligt.

# 5. Styrkir og veikleikar við verandi bygnaði

Við støði í lýsingini av, hvørjar uppgávurnar eiga at vera hjá einum stjórnarráði, og í lýsingini av bygnaðinum í landsfyrisitingini, verður her skift orð um styrkir og veikleikar í verandi skipan í mun til uppgávurnar. Harafturat verða so hvørt givin uppskot um møguligar tillagingar. Summi av uppskotunum kunnu gerast uttan at broyta bygnaðin, aðrar tillagingar hava sum fortreyt, at partar av honum verða broyttir.

Hóast tað ikki er partur av hesi verkætlan at finna ítøkiligar loysnir til, hvussu ætlaðu sparingarnar hjá Landsstýrinum skulu fremjast, er arbeiðsbólkurin av tí fatan, at flestu av uppskotunum um tillagingar í bygnaðinum fara at hava við sær eina skynsamari og helst bíligari fyrisiting. Skal kostnaðurin av stjórnarráðunum minkast enn meira, má virksemið avmarkast samsvarandi.

Parturin er skipaður í trý: 1. Stjórnarráðið sum tænastueind hjá landsstýrisfólkinum, 2. Stjórnarráðið sum evsti fakligi myndugleiki, 3. Bygnaður.

## Stjórnarráðið sum tænastueind hjá landsstýrisfólkinum

Tað gerst ein alsamt størri partur av uppgávuni hjá embætisverkinum og serliga leiðsluni at stuðla og ráðgeva landsstýrisfólkunum í samskiftinum, bæði við fjølmiðlar og við tingið. Hetta kemst serliga av, at tíðindaflutningurin gongur skjótari og skjótari, at tað ofta eru einstøk mál og einstaklingamál, sum fjølmiðlarnir seta á dagsskrá, og fyrispurningarnar úr tinginum gerast eisini fleiri.

Fortreytirnar at veita landsstýrisfólkunum eina munagóða tænastu eru munandi betri í verandi skipan, har hvørt landsstýrisfólk hevur egna fyrisiting, enn áðrenn, tá nakrir fáir fulltrúar vístu til fleiri landsstýrisfólk.

Sum sæst í fylgiskjali 8 verður mett, at 14 % av orkuni, svarandi til 19 ársverk í stjórnarráðunum, taka sær av uppgávum, sum á einhvønn hátt snúgva seg um kunning, at skipa gerandisdagin hjá landsstýrisfólkunum, politiska ráðgeving og at svara fyrispurningum úr tinginum, (virkisøki 3, 5 og 6).

Um hetta er nógv ella lítið, er torført at meta um, tí hetta er ein av kjarnuuppgávunum hjá einum stjórnarráði. Tá tað er sagt, so er talan um uppgávur, sum fylla nógv, tá ið á stendur. Tað merkir samstundis, at minni orka er til tær uppgávur, sum meira beinleiðis snúgva seg um at greina og menna samfelagsviðurskifti, og at gera politisku málini hjá Landsstýrinum til veruleika. Tí má henda kjarnuuppgáva verða skipað so effektivt sum gjørligt.

Tá tosað verður um ráðgevandi skylduna hjá embætisverkinum, verður spurningurin um loyalitetsskylduna og markið millum politikk og fyrisiting javnan settur. Hvar gongur markið fyri politiskari ráðgeving hjá einum embætisfólki í føstum starvi? Hvat ber loyalitetsskyldan við sær? Hetta eru viðurskifti, sum skipanirnar í flestu grannalondunum støðugt arbeiða við og síggja sum eina avbjóðing í sambandi við at finna røttu javnvágina. Hesi viðurskifti eru enn týdningarmeiri at umrøða í føroyskum samanhangi.

Sum lýst í fyrsta parti er søgan hjá føroyskari fyrisiting ung, serliga tá samanborið verður við onnur lond í vesturheiminum. Fyrimunurin er, at skipanin skuldi ikki verið so bundin av gomlum siðvenjum, sum ikki longur eru skynsamar, og tí skuldi verið lættari at gjørt tillagingar, tá tørvur er á tí. Vansin kann vera, at fyrisitingarliga mentanin er ikki nóg væl kjølfest, hvørki hjá fyrisiting ella politikarum. At vit samstundis hava eina óformliga skipan, har fá

formlig krøv eru til arbeiðsbýtið millum politikarar og embætisfólk, umframt at vit hava politiskar flokkar við sera avmarkaðari orku at menna politikarar til at gerast landsstýrisfólk og tingfólk, kann avleiðingin verða, at ivi stendst um, hvør uppgávan og skyldan er hjá ymsu pørtunum.

Arbeiðsbólkurin metir, at tørvur er á at seta kunning og ráðgeving á dagsskrá. Fáa landsstýrisfólk nóg góða ráðgeving og sparring frá embætisverkinum um samskifti við fjølmiðlar og um politisk viðurskifti? Fáa landsstýrisfólk nóg gott fakligt mótspæl? Megna aðalstjórar bæði at leiða stjórnarráðini, samstarva við stovnar og at vera nærmastu politisku ráðgevar hjá landsstýrisfólkum? Er tørvur á formligum ásetingum um arbeiðsbýtið millum embætisfólk og politikarar? Hevði tað verið ein loysn, at landsstýrisfólkini fingu møguleika at velja sær ein politiskt settan ráðgeva ella at havt politiskt sett embætisfólk, eins og grannalondini hava tað?

Hetta eru samansettir spurningar, sum einki einfalt svar hava, og sum krevja støðugt orðaskifti. Arbeiðsbólkurin metir, at viðurskiftini eiga at verða lýst betur, so at greiða fæst á, um tørvur er á broytingum. Viðvíkjandi spurninginum um politiskar ráðgevar heldur arbeiðsbólkurin, at í fyrstu syftu eigur politiska skipanin at gera sær greitt, hvørt tørvur er á at broyta skipanina, og síðan eigur at verða samskift við embætisverkið um, hvussu ein slík skipan kann sameinast við fasta embætisverkið.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað hevði verið skilagott at orðað ein kunningarpolitikk fyri landsfyrisitingina, eins og mælt varð til í 1997. Bólkurin metir eisini, at tað hevði lætt um arbeiðsbyrðuna hjá stjórnarráðunum, um fyrispurningar úr tinginum vórðu lagaðir betur til innihaldið, t.d. soleiðis at umfatandi spurningar vórðu settir skrivliga heldur enn munnliga. Mælt verður til at bera hetta upp á mál við løgtingsfyrisitingina. Mett verður eisini, at tað hevði lætt um hjá fyrisitingini og styrkt um gjøgnumskygnið at gjørt fleiri viðurskifti alment atkomulig. Sum frálíður metir arbeiðsbólkurin, at fyrisitingin eigur at fara til sjálvtøku á innlitsøkinum. Onnur øki, sum kundu verið gjørd atkomulig á t.d. einum borgaraportali, kundu verið yvirlit yvir øll almenn loyvir, hvørji lógaruppskot og størri verkætlanir eru í gerð, og hvørjar hoyringar eru úti.

### Stjórnarráðið sum evsti fakligi myndugleiki

*Stjórnarráðið skal virka fyri, at politisku ætlanirnar hjá sitandi landsstýrisfólki verða til veruleika.*

At landsfyrisitingin er styrkt síðan umskipanina í 1997, hevur givið betri umstøður at gera greiningar, orða politikkir, fyrireika og skriva lógaruppskot og at tryggja, at lógirnar verða íverksettar og eftirmettar.

Í metingini av orkunýtsluni, (fylgiskjal 8), varð mett, at um 11 % av orkuni í landsfyrisitingini verða nýtt til politikkfyrireikandi arbeiði, og um 13 % verða nýtt til lógarfyrireikandi arbeiði.

Tá hugsað verður um vaksandi trýstið á vælferðarsamfelagið, lítlu granskingina í samfelagsviðurskiftum, og at talan er um kjarnuuppgávuna hjá landsfyrisitingini, sum er at gera politiskar ætlanir til veruleika, er arbeiðsbólkurin sannførdur um, at hesar uppgávur áttu at verið størri partur av orkunýtsluni.

Skal landsfyrisitingin tryggja, at tað almenna støðugt verður rikið væl og effektivt, má orka vera til at greina samfelagsavbjóðingar, at gera lógir til føroysk viðurskifti, og at vera væl inni í altjóða lógum, t.d. ES-lógum, har tørvur er á tí.

Tí eigur arbeiðið í stjórnarráðunum at verða skipað, soleiðis at sum mest av orkuni fer til greiningar og til politikkfyrireikandi og lógarfyrireikandi arbeiði. Ein annar lið-

ur í at styrkja henda partin kundi verið at skipa eina felagseind, sum greinaði og granskaði yvirskipað samfelagsviðurskifti, har starvsfólk úr stjórnarráðunum kundu starvast í avmarkaða tíð.

Arbeiðsbólkurin er greiður um, at tað er ikki lætt at gera umraðfestingar, tí eitt stjórnarráð skal taka sær av nógvum ymiskum uppgávum, eins og lýst í fjórða parti og fylgiskjali 8. Men støðug og miðvís raðfesting av, hvar største tørvurin er, og tilvitan um kjarnuuppgávurnar hjá einum stjórnarráði, skuldu verið stig á vegnum. Leiðslan má tó gera sær greitt, at talið á fulltrúum er sera avmarkað í hvørjum stjórnarráði, og hetta setir mørk fyri, hvussu nógvar verkætlanir kunnu setast í gongd í senn.

Javnan verður víst á, at eitt lítið samfelag sum okkara hevur tørv á einum so einføldum lógarverki sum gjørligt. Skulu vit gera fleiri serføroyskar lógir, tá ið tað er skilagott, má orka verða sett av til at greina tær avbjóðingar, sum skulu loysast. Arbeiðsbólkurin hevur hartil varhugan av, at lítið verður gjørt við at eftirmeta, um samtyktar lógir hava ætlaða ávirkan. Hetta kann ikki annað enn skeikla góðskuna og neyvleikan í framleiðsluni.

Lóggávan verður alt meira umfatandi, og mangan er orka ikki til at gera kunngerðir ella til at dagføra lóggávuna. Javnan sæst, at mál verða skundað ígjøgnum, og at lógaruppskot eru ikki liðug, tá tey koma í tingið. Skundurin gongur harafturat út yvir hoyringina. Avleiðingin er, at møguleikin at fáa góð ískoyti til arbeiðið fer fyri skeytið. Harafturat verða loysnirnar ikki eins góðar, sum tá ið eitt mál fær neyðugu tíðina og viðgerðina.

Við avmarkaðu orkuni í huga eiga vit at vera serliga varin at skipa øki við lóg. Ofta er skynsamari at stýra einum øki á annan hátt, t.d. við ráðgeving ella við at meta um, hvørt tørvur yvirhøvur er á at regulera økið. Serliga má ansast eftir ikki at seta treytir, sum vit ikki kunnu halda.

Í fyrstu atløgu eigur fyrivarni altíð at verða tikið vegna Føroyar, tá ið millumtjóðasáttmálar koma upp á tal. Sáttmálar eiga ikki at verða settir í gildi, fyrr enn neyðugu greiningarnar eru gjørdar, og fíggjarliga orkan er avsett.

Arbeiðsbólkurin metir, at tørvur er á einari skipan, sum tryggjar, at mett verður, hvørt ein ætlan um at gera eina lóg er tann skynsamasta í mun til føroyska samfelagið.

Harafturat metir arbeiðsbólkurin, at lógatænastan átti at verið víðkað til eina felags løgfrøðiliga tænastueind, so at løgfrøðingar bert vóru staðsettir í stjórnarráðunum, tá ítøkiligur tørvur var á tí.

Javnan er frammi í almenna orðaskiftinum, at álit ikki verða brúkt, og lógir ikki fáa politiska undirtøku. Hetta er als ikki gott fyri so lítla fyrisiting, bæði tí at orkan kundi verið betur nýtt, og tí at tað kann vera tyngjandi fyri arbeiðshugin hjá starvsfólkunum og umdømið hjá fyrisitingini, um arbeiðið ikki kemur til gagns.

Tað eru helst ymsar orsøkir til, at slíkt kemur fyri. Ein orsøk kann vera, at raðfestingarnar hjá stjórnarráðunum ikki verða nóg væl gjøgnumhugsaðar og diskuteraðar við politisku leiðsluna. Ein onnur orsøk kann vera, at neyðuga politiska undirtøkan er ikki fingin til vegar, áðrenn arbeiðið verður sett í gongd.

Sum lýst í triðja parti er mannagongdin fyri at leggja mál fyri landsstýrisfund eitt stórt framstig í hesum samanhangi. Føstu landsstýrisfundirnir og stjóraráðsfundirnir eru tó ikki nóg mikið, tí hesir fundir snúgva seg oftast um áleikandi mál heldur enn um felags langtíðarraðfestingar. Heldur ikki er siðvenja at samskipa langtíðarraðfestingar hjá stjórnarráðunum.

Vandin er, at ráðini ikki hava nóg góða vitan um, hvørjar ætlanir eru á ymsu málsøkjunum. Tað gongur út yvir møguleik-

an at samskipa orkuna og loysnirnar. Sum dømi kann nevnast, at samstarvs- og hoyringspartar uppliva, at átøk í sambandi við beinleiðis ella óbeinleiðis samanhangandi øki verða sett í verk ella reglurnar broyttar uttan nakra samskipan. Her átti at kunnað borið til at bøtt um støðuna, tí smáu og ungu eindirnar skuldu givið stak góðar fortreytir fyri neyvari samskipan og harvið betri samfelagsloysnum.

Arbeiðsbólkurin metir, at tørvur er á mannagongdum, sum tryggja, at álit og lógaruppskot ikki verða gjørd til onga nyttu. Ein háttur kundi verið at havt fleiri sløg av landsstýris- og stjóraráðsfundum, sum vóru málrættaðir eftir evnum. Ein annar háttur kundi verið at samskipa ársætlanirnar hjá stjórnarráðunum. Ein triði háttur at styrkt um tilvitanina um politiska undirtøku kundi verið skipanin, tey hava í Finnlandi, har krav er um 2/3 meiriluta, tá talan eru um serliga stórar broytingar.

Harafturat eigur at verða arbeitt við at fáa tvørgangandi arbeiðsbólkar at virka betur. Ein vegur kundi verið at orða mannagongdir fyri, hvussu karmarnir skulu vera fyri slík arbeiði, har ein samstundis avsetir neyðuga orku, so at fólk veruliga fær stundir at taka sær av slíkum uppgávum. Samskipanin og sparringin millum stjórnarráð á deildarleiðara- og fulltrúastigi eigur eisini at verða styrkt, serliga í byrjanini av einari tilgongd, meðan tað framvegis ber til at ávirka ætlanina, uttan at hetta krevur nógva eykaorku.

*Stjórnarráðið skal taka sær av tí yvirskipaðu stýringini og menningini av málsøkinum*

Sum nevnt í undanfarna parti er samstarv og samskipan millum stjórnarráð og stovnar ein sera týdningarmikil partur av uppgávuni hjá stjórnarráðunum. Bæði fyri at tryggja, at virksemið á stovnunum er nøktandi og í samsvari við politisku ynskini, og fyri at tryggja eina skynsama nýtslu av avmarkaðu orkuni í fyrisitingini.

Mett verður, at 9 % av orkuni í stjórnarráðunum verða brúkt til samskifti, samskipan og eftirlit við undirskipaðum stovnum. Ein avbjóðing kann vera, at orkan í stjórnarráðunum ikki røkkur til stórt meira enn at hava eftirlit við, at stovnsleiðarar hava roknskapin í lagi, og tá kreppur stinga seg upp. Tí kann tað vera ein avbjóðing at raðfesta somu øki samstundis og at gera gagn av serfrøðini á stovnunum. Samskipanin millum stjórnarráð og stovnar er styrkt á fleiri málsøkjum seinastu árini, har avtalur eru gjørdar um uppgávubýti, mál og avrikssáttmálar. Arbeiðsbólkurin mælir til, at stjórnarráðini menna mannagongdir, sum tryggja, at samstarvið við stovnar verður samskipað sum best.

At stjórnarráðini ikki eru kærumyndugleiki í so nógvum málum longur kann hugsast at geva betri møguleikar fyri at loysa uppgávur í samstarvi við stovnarnar.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at stjórnarráðini í mest møguligan mun leggja kærurnar út til eina nevnd við Kærustovninum sum skrivstovu, eisini starvsfólkamál. Harafturat eiga at verða orðaðar mannagongdir fyri, hvussu ein viðger klagur um viðurskifti, sum ikki eru lógarskipað. Arbeiðsbólkurin hevur fatan av, at hetta til tíðir fyllir rættiliga nógv á summum málsøkjum.

Sum lýst í triðja parti hevur gongdin á flestu málsøkjum seinastu árini verið, at farið er frá upprunaliga bygnaðinum, har stovnar ella stovnspartar vóru inni í stjórnarráðum, og til at teir nú støðugt eru fluttir út. Á summum málsøkjum er tó framvegis fitt av málsviðgerð og rakstraruppgávum.

Sum sæst í fylgiskjali 8 verður mett, at um 8 % av orkuni, svarandi til 12 ársverk, framvegis taka sær av málsviðgerð í mun til borgarar, vinnu o.s.fr. Sum nevnt í fjórða parti kann avleiðingin vera, at minni orka verður nýtt til yvirskipaðu menningina av málsøk-

inum, bæði hjá politikarum og embætisfólkum. Hetta kann harafturat føra til, at spurnartekn kann verða sett við, um málsviðgerin er óheft av politiskum áhugamálum.

Skipanin við landsstýrismannaábyrgd hevur tað við sær, at stjórnarráðini altíð hava nakað av málsviðgerð, serliga av prinsipiellum slag. Arbeiðsbólkurin mælir tó til, at málsviðgerð og operativar uppgávur í mestan mun verða fluttar úr stjórnarráðunum fyri at fáa betri orku og yvirlit til at seta yvirskipaðu kósina fyri málsøkið. Í summum londum, t.d. Svøríki, er skipanin farin eitt stig longur og hevur sett skott ímillum stovnar og stjórnarráð, so at politiska leiðslan ikki sleppur inn í fyrisitingarligar avgerðir yvirhøvur.

Øll stjórnarráð eiga at hava ein ella nakrar fáar stovnar, har allar uppgávur verða savnaðar, hóast tær eru evnisliga ymiskar.

### Bygnaður

Fortreytirnar at tryggja stabilitet og samanhang eru vorðnar munandi betri við størri og sterkari fyrisitingarligum eindum. Harafturat hava lógin um ábyrgd landsstýrismanna og kunngerðin um málsøkjabýtið havt við sær greiðari ábyrgdarbýti, bæði millum málsøki og á sjálvum økjunum.

Á summum málsøkjum hevur tó verið nógv órógv. Tað er sera orkukrevjandi, tá ið stjórnarráð verða niðurløgd, málsøkir verða flutt ella stovnar verða samanlagdir, og ofta gongur long tíð, áðrenn framleidnið verður eins gott og áður. Tí skal grundreglan vera at vísa størsta varsemi við at flyta málsøkir. Eitt, sum bæði hevði givið betri stabilitet og bíligari rakstur, hevði verið at ásett færri stjórnarráð í stýrisskipanarlógini. Ráðini skulu eisini vera nøkulunda líka stór. Metir politiska skipanin, at tørvur er á fleiri landsstýrisfólkum enn fastsetta talið av stjórnarráðum sigur, kunnu fleiri enn eitt landsstýrisfólk vera í hvørjum ráði. Til tess krevst góð stýring, og fastar mannagongdir mugu verða orðaðar. Skipanin við fleiri ráðharrum í sama stjórnarráð verður brúkt í øllum grannalondum okkara.

Hóast stjórnarráðini eru væl størri enn deildirnar á Landsskrivstovuni, er talan framvegis um sera smáar eindir. Fyrimunurin er, at góðir møguleikar eru fyri liðiligum arbeiðsgongdum. Ofta er stuttur vegur frá fulltrúa til politikara, og harvið skuldi verið minni vandi fyri misskiljingum og óneyðugum bureaukratii. Vansin er, at uppgávurnar eru nógvar og starvsfólkini fá. Arbeiðslagið kann tí gerast óstøðugt, og trupult verður at uppraðfesta øki, uttan at onnur verða løgd lamin í meðan.

Smáu eindirnar føra eisini til, at hvørt starvsfólk kann hava sera stór ábyrgdarøki. Fyrimunurin er, at hvør einstakur ger stóran mun, og hetta styrkir arbeiðshugin og ábyrgdarkensluna. Vansin er, at starvsfólkini ofta sita sera einsamøll við uppgávunum og hava ikki nóg góða sparring. Úrslitið kann verða, at dygdin í arbeiðinum verður ikki eins góð, og hon kundi verið, um fleiri vóru um uppgávuna. Harafturat kann hugsast, at uppgávurnar, sum ofta eru sera samansettar og tungar, kunnu kennast møtimiklar. Hartil verður skipanin sera viðkvom, tí ráðið verður so heft av vitanini hjá tí einstaka starvsfólkinum. Tá eingin annar er í skipanini, sum hevur innlit í økini, skal byrjast á berum, um viðkomandi fer úr starvi. Tað kann eisini vera ein vansi fyri álitið á embætisverkið, at áhugaðir partar kunnu seta javnatekn millum ein ávísan persón í embætisverkinum, og hvussu eitt øki verður fyrisitið.

Ein háttur at styrkt henda partin kundi verið at farið frá deildarskipanini til eina skipan við toymum og verkætlanum. Hetta kundi bæði spart upp á útreiðslurnar og givið betri grundarlag fyri dynamiskari eindum, hóast hetta í fyrstu atløgu hevði kostað orku. Ein slík skipan hevði sjálvandi

skulað tikið hædd fyri, at talan er um eina politiska fyrisiting og ikki eina fyritøku. At finna ymsar hættir at skipa arbeiðið í stjórnarráðum verður eisini roynt í øðrum londum. Endamálið er serliga at kunna laga seg til broyttu arbeiðsuppgávurnar, sum í alt størri mun snúgva seg um greining og menning heldur enn um málsviðgerð.

Ein avbjóðing í føroysku fyrisitingini er, at starvsfólkini ofta koma beint av útlendskum skúlabonki og mangla sostatt eina upplæring um føroyska samfelagið, lógarverkið o.s.fr. Henda støða saman við avmarkaðu samfelagsgranskingini ger, at vandi er fyri, at tey, sum skulu hava ábyrgdina av at menna skipanir og smíða lógir, ikki hava nóg gott innlit í føroysk viðurskifti. Sum áður nevnt, verður eisini sera lítið gjørt við at menna eina fyrisitingarmentan, grundað á fyritreytirnar hjá føroyska samfelagnum.

Hesin partur kundi verið styrktur við at skipa eina grundútbúgving fyri øll, sum verða sett í starv stjórnarráðunum. Útbúgvingin skal tryggja eitt grundleggjandi innlit í føroyska samfelagið og í føroyskar lógir og skipanir og kann verða ment í samstarvi við Fróðskaparsetrið. Tað kundi verið eitt krav við útbúgvingini, at starvsfólk skiftu ímillum stjórnarráðini og eisini arbeiddu á stovnum so sum Almannaverkinum og TAKS. Tá ið grundútbúgvingin er liðug, eigur at verða skipað ein eftirútbúgving, sum tryggjar, at starvsfólkini støðugt verða ment.

Sum nevnt í triðja parti eru í dag færri tænastustørv og fleiri fulltrúastørv í stjórnarráðunum. Hetta kann merkja, at lutfalsliga meiri orka er til politikkskapandi og lógarfyrireikandi uppgávur, men ein avleiðing er eisini, at flestu uppgávur skulu røkjast av akademikarum. Hetta kann vera ein bæði dýrari og verri loysn, og tí er tørvur á at arbeiða miðvísari við tænastupartinum, so at greiða fæst á, hvørjar uppgávur ein akademikari skal loysa, og hvørjar uppgávur eitt skrivstovufólk skal loysa.

At stjórnarráðini ikki eru savnað í einum bygningi ger, at fakliga umhvørvið er ikki so sterkt, sum tað kundi verið, og arbeiðsorkan verður heldur ikki brúkt nóg effektivt. Mett verður, at 22 % av orkuni fara til rakstraruppgávur so sum fíggjarstýring, skráseting o.a., (fylgiskjal 8, virkisøki 14, 15, 16, 17 og 18). Vóru tey undir einari lon, høvdu hesar uppgávur kunnað verið skipaðar í eina fakliga sterkari og fjølbroyttari felags umsitingareind, sum vísti til eitt og sama landsstýrisfólk. Í hesi eind høvdu eisini kunnað ligið aðrar felagsuppgávur so sum starvsfólkamál og fyrrnevnda løgfrøðieind og greiningareind. Hetta hevði givið munandi betri fortreytir fyri at tryggja samanhang, skynsemi og bestu arbeiðsumstøður.

Verða stjórnarráðini samansavnað, kundi ein annar møguleiki verið at skipað tey í ein bygnað undir einum leiðara, sum hevur ábyrgd av at reka alt økið. Hetta kundi givið betri møguleikar at raðfesta, arbeiða skipað við starvsfólkamenning og tryggja, at ikki ov nógvar verkætlanir verða settar í gongd í senn.

Tað hevði tó framvegis kravt, at landsstýrisfólkini høvdu hvør sína tænastueind, sum hevði ábyrgd av dagligu sparringini og planleggingini. Fyri at starvsfólkini í felagseindini ikki skulu enda í tvístøðu millum fleiri landsstýrisfólk, krevur ein slík skipan sterka og miðvísa leiðslu og greiðar mannagongdir.

Yvirhøvur metir arbeiðsbólkurin, at í eini skipan, sum hevur sera avmarkaða arbeiðsorku, og sum harvið krevur støðuga og neyva raðfesting og skilabestu nýtslu av orkuni, er tørvur á at fara meiri strategiskt og miðvíst til verka fyri at menna eina sterka leiðslu, t.d. við leiðsluútbúgvingum og støðugari supervisión.

# 6. Yvirlit yvir tillagingar

Í undanfarna parti eru nevnd ymisk uppskot um, hvat kann gerast fyri at bøta um summar av veikleikunum í stjórnarráðunum. Í hesum parti er yvirlit yvir uppskotini, sum hava sum fortreyt, at bygnaðarligar broytingar verða framdar. Hóast tað ikki er partur av hesi verkætlan at finna ítøkiligar loysnir til, hvussu ætlaðu sparingarnar hjá Landsstýrinum skulu fremjast, er arbeiðsbólkurin av tí fatan, at flestu av hesum uppskotum fara at hava við sær eina skynsamari og helst bíligari fyrisiting. Skal kostnaðurin av stjórnarráðunum minkast enn meira, má virksemið avmarkast samsvarandi.

- Áseta færri stjórnarráð í stýrisskipanarlógini. Hetta hevði givið betri stabilitet og bíligari rakstur. Er tørvur á tí, ber til at hava meira enn eitt landsstýrisfólk í hvørjum stjórnarráði.

- Skipa stjórnarráðini í toymir/verkætlanir heldur enn í deildir. Hetta kundi bæði minkað um útreiðslurnar og givið betri grundarlag fyri dynamiskari eindum.

- Flyta uppgávur, sum ikki eru kjarnuuppgávur, út úr stjórnarráðum fyri at styrkja førleikan at røkja kjarnuuppgávurnar og fyri at tryggja landsstýrisfólkunum betri arbeiðsnáðir.
  - Flyta málsviðgerð og rakstur av málsøkjum til stovnar, tá ið til ber.
  - Flyta kæruviðgerð, herundir starvsfólkamál, til nevndir við Føroya kærustovni sum skrivstovu.

- Miða ímóti at hava so nógvar felagstænastur, sum til ber, fyri at tryggja samanhang, skynsemi og bestu arbeiðsumstøður. Fortreytin er, at landsfyrisitingin verður savnað á sama øki ella í sama bygningi.
  - Stovna felags umsitingareind, sum eitt landsstýrisfólk hevur ábyrgdina av. Uppskot um uppgávur:
    - Móttøka
    - Journalskipan
    - Bókhald
    - KT, her undir felags intranet/heimasíðu

  - Harafturat høvdu onnur øki kunnað verið skipað í felagseindir:
    - Starvsfólkafyrisiting
    - Løgfrøðilig tænastueind
    - Eind fyri fyrisitingarliga greining og gransking

- Eindarfyrisiting:
  - Ein annar møguleiki er at leggja um til eina eindarfyrisiting undir einum fyrisitingarligum leiðara, sum hevur yvirskipaðu ábyrgdina av at reka alla fyrisitingina.
    - Betri møguleikar at raðfesta, arbeiða skipað við starvsfólkamenning og tryggja, at ikki ov nógvar verkætlanir verða settar í gongd í senn.
    - Hvørt landsstýrisfólk hevur framvegis sína tænastueind, sum tekur sær av dagligu sparringini og planleggingini.
    - Fyri at starvsfólkini í felagseindini ikki skulu enda í tvístøðu millum fleiri landsstýrisfólk, krevur ein slík skipan sterka og miðvísa leiðslu, raðfesting og greiðar mannagongdir.

# 7. Upplegg til orðaskifti

Endamálið við hesum kjakuppleggi er at skapa eitt grundarlag undir eitt orðaskifti um uppgávurnar hjá landsfyrisitingini, og um verandi bygnaður er tann skynsamasti til føroyska samfelagið. Spurningarnir, sum arbeiðsbólkurin metir eru týdningarmestir at skifta orð um, eru:

- Er lýsingin í fjórða parti av kjarnuuppgávunum hjá einum stjórnarráði og av krøvunum til embætisverkið nøktandi? Eru uppgávurnar, sum eitt stjórnarráð eigur at taka sær av, lýstar?

- Hvørjar eru størstu styrkirnar, og hvørjir eru størstu veikleikarnir í verandi skipan í mun til uppgávurnar?

- Er tørvur á at gera tillagingar av verandi bygnaði? Um ja, hvørjar eru mest átrokandi tillagingarnar?

# Fylgiskjøl

**Fylgiskjølini 1 til 7** eru lýsingar av uppgávunum og bygnaðinum í stjórnarráðunum. Harafturat er yvirlit yvir, hvørjir stovnar vísa til hvørt stjórnarráð. Lýsingarnar eru fyrst og fremst úr fíggjarlógini og av heimasíðunum hjá stjórnarráðunum.

Í **fylgiskjali 8** sæst yvirlit yvir uppgávurnar í stjórnarráðunum, hvat samlaða orkunýtslan varð mett at vera í mun til ymsu uppgávurnar, og hvat hetta svarar til í mun til tal av starvsfólkum.

**Fylgiskjal 9** er virðisgrundarlagið hjá landsfyrisitingini.

**Fylgiskjal 10** er ein yvirskipað lýsing av, hvussu stjórnarráð í Norðurlondum, UK og Niðurlondum eru skipað.

# 1. Løgmansskrivstovan § 2:

**Játtan til alla § 2 í 2014:** 67 mió.kr.
**Játtan til sjálvt stjórnarráðið í 2014:** 31 mió. kr.r.*) **)
*) íroknað serstakari játtan í 2014 uppá 7 mió. kr. til tvey gerðarrættarmál
**) Íroknað felagsfyrisitingina í Tinganes (3 starvsfólk, olju, el, tryggingar o.a.)

Løgmansskrivstovan er fyrisiting løgmans, ið varðar av stjórnarmálum, uttanríkismálum og løgmálum. Høvuðsendamálið hjá Løgmansskrivstovuni er at veita løgmanni ráð, tryggja haldgott grundarlag og gera hugskot til veruleika á nevndu málsøkjum.

*Stjórnarmál* fevna um tær uppgávur, sum løgmanni eru tillutaðar samsvarandi stýrisskipanini. *Uttanríkismál* fevna um millumtjóðasamstarv, menningarsamstarv og altjóðagerð. *Løgmál* fevna um lógarverkið á løgmálaøkinum, umframt eftirkanning av lóg- og kunngerðaruppskotum fyri alla landsfyrisitingina.

**Starvsfólk:**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skrivstovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 5 | 14,6 | 9,9 *) | 29,5 |

*) Trý fólk arbeiða fyri fleiri stjórnarráð (Felagsfyrisitingin í Tinganesi).

**Bygnaður:**
Løgmansskrivstovan er skipað í hesar eindir:

**Ritaraeind**
Ritaraeindin er forskrivstova løgmans og løgmansstjórans. Ritaraeindin hevur eisini um hendi innanhýsis samskipan av málum at leggja fyri løgmann, kunning og samskifti, protokol og løgfrøðiliga ráðgeving.

**Stjórnartænasta**
Stjórnartænastan situr fyri samskipan og eftirliti løgmans. Stjórnartænastan umsitur landsstýrisfundir, løgmansfundir, stjóraráðsfundir og annað virksemi, ið hevur at gera við samskipan. Harumframt er ábyrgdarøkið at standa fyri tvørvegis verkætlanum millum stjórnarráðini.

**Umsiting**
Umsitingin situr fyri HR- og starvsfólkamálum, bókhaldi, roknskapi, fíggjarstýring, journal/skráseting, umsiting av ognum í Tinganesi, KT, telefonmóttøku, matstovu, politiskari upplýsing og praktiska partinum viðvíkjandi sendistovum.

**Lógatænasta**
Lógatænastan hevur fakligu ábyrgdina av løgmálum, sum fevnir um bæði lóggávu, sum er undir føroyskum málsræði, og so ríkislóggávu á løgmálaøkinum, umframt lógadygd og eftirkanning av lógum og kunngerðum.

**Uttanríkistænasta**
Uttanríkistænastan situr fyri uttanlandsmálum, so sum altjóðarætti, havrætti, handilsviðurskiftum, trygdarmálum, millumlandasamstarvi um havtilfeingi og burðardygga menning, økisbundnum samstarvi íroknað norðurlandamál, tjóðarbranding, menningarsamstarvi, útflutningsframa og konsularviðurskiftum. Harafturat varðar hon av limaskapum í fleir- og millumtjóðafelagsskapum, sum IMO, FAO, UNESCO, NEAFC, NAFO, NASCO, IWC, NAMMCO og Arktiska Ráðnum.

| Sendistovurnar, sum eru partur av LMS og stovnar, sum vísa til LMS | Fulltíðar-størv | Játtan 2014 í tkr. |
|---|---|---|
| Sendistova Føroya til Bretlands og Írlands | 2 | 2.612 |
| Sendistova Føroya til Danmarkar | 2,5 | 3.310 |
| Sendistova Føroya til Evropasamveldið | 2 | 2.558 |
| Sendistova Føroya til Íslands | 2 | 2.024 |
| Sendistova Føroya til Russlands | 1 | 2.000 |
| Føroya Kærustovnur | 8 | 5.245 |
| Dátueftirlitið | 2,8 | 2.000 |

# 2. Fíggjarmálaráðið § 3:

**Játtan til alla § 3 í 2014 :** 445 mió. kr.
**Játtan til stjórnarráðið í 2014:** 11 mió.kr.
**Játtan til innkrevjing av skattum og avgjøldum í 2014 :** 4.692 mió. kr.

Fíggjarmálaráðið er fyrisiting hjá landsstýrismanninum innan málsøki landsstýrismansins samsvarandi galdandi málsøkjabýti løgmans. Høvuðsmálsøkini eru: Búskaparmál, fíggjarmál, skatta- og avgjaldsmál, peninga- og kredittmál, lønarmál, kommunal fíggjarmál, hagfrøðismál og undirstøðukervismál.

Stjórnarráðið fyriskipar landsins fíggjar- og búskaparstýring og skapar grundarlag fyri, at landsstovnar greiða sínar uppgávur væl fíggjarliga. Ráðið fylgir við gongdini í búskapinum og ger búskaparfrágreiðingar í sambandi við játtanarkarmar og fíggjarlógaruppskot. Ráðið stendur eisini fyri lønarsamráðingum hjá landinum og umsitur reglur og vegleiðingar um hetta.

**Starvsfólk:**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skrivstovu-fólk o.o. | Starvs-fólk íalt |
|---|---|---|---|
| 2 | 11 | 3 | 16 |

**Bygnaður:**
Stjórnarráðið er skipað í 6 arbeiðsøkir. Fíggjarmál, Búskap, Skattir, Lønarmál (almenni sektorurin), Kommunumál og Infrakervi. Starvsfólk hava eitt høvuðsøki og eitt sekundært arbeiðsøki. Ráðið hevur, umframt aðalstjóra, ein stjóra, sum fyrisitur lønarmál (lønardeild).

Ráðið arbeiðir eftir einum verkætlanarleisti. Hetta merkir, at allar uppgávur verða skipaðar samsvarandi hesum og mettar útfrá, hvussu kompleksar tær eru. Lættar uppgávur verða avgreiddar av einum persóni. Kompleksar uppgávur verða loystar av toymum, har eitt starvsfólk er projektleiðari.

| Stovnar, sum vísa til Fíggjarmálaráðið | Fulltíðarstørv | Játtan 2014 mió. kr. |
|---|---|---|
| TAKS | 114 | 68 |
| Gjaldstovan | 39,5 | 30 |
| Hagstovan | 22 | 11 |
| Landsverk | 126 | 60 |
| Búskaparráðið | 1,5 | 2 |

# 3. Fiskimálaráðið § 5:

**Játtan til alla § 5 í 2014 :** 173 mió. kr.
**Játtan til stjórnarráðið í 2014:** 15 mió. kr.

Fiskimálaráðið hevur yvirskipaðu fyrisitingarligu ábyrgdina av málsøkjunum innan fiskivinnu og landbúnað. Fiskimálaráðið hevur til uppgávu, at:

- Vera fyrisiting hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum
- Virka sum umboð fyri landsstýrismannin og taka avgerðir hansara vegna
- Vera yvirskipað leiðsla og myndugleiki hjá deildum og stovnum
- Standa fyri avgreiðslum vendar ímóti borgaranum

**Starvsfólk í stjórnarráðnum:**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skrivstovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 4 | 9 | 5,2 | 18,2 |

**Bygnaður:**
Fiskimálaráðið er skipað í hesar eindir:

**Fiskivinnustovan** tekur sær av fiskivinnusamráðingum, altjóða samstarvi, menning av fiskivinnulóggávu, skipan av fiskiskapi og loyvisumsiting.

**Fíggjar- og starvsfólkadeildin** tekur sær av fíggjarmálum, skráseting/journal, starvsfólkamál, KT, kunning, samskifti og húsamál.

**Løgdeildin** tekur sær av løgfrøði, umhvørvismálum, matrikul/tinglýsing/landsfólkayvirliti, tilbúgvingarmálum og landbúnaðarmálum.

Harafturat er eitt toymi fyri fiskivinnusamráðingar, sum snúgva seg um makrel og sild og annað altjóða samstarv, og ein toymissamskipari, sum tekur sær av fiskivinnuroyndum, royndarloyvum og landbúnaðarroyndum.

| Stovnar, sum vísa til Fiskimálaráðið | Fulltíðarstørv | Játtan 2014 í tkr. |
|---|---|---|
| Vørn – fiskiveiðieftirlit, tilbúgvingarsamskipan, MRCC / Tórshavn Radio og veðurtænasta *) | 80 | 57,5 |
| Havstovan | 37 | 24,1 |
| Umhvørvisstovan | 39 | 17,3 |
| Búnaðarstovan | 11,2 | 4,9 |

*) Upphæddin í sambandi við tyrlutænastuna er ikki tikin við. Atlantic hevur sáttmála við landið (Fisk og VMR) uppá 36 mió. árliga.

# 4. Vinnumálaráðið § 6:

**Játtan til alla § 6 í 2014:** 323 mió. kr.
**Játtan til stjórnarráðið í 2014:** 11 mió. kr.

Vinnumálaráðið er stjórnardeild landsstýrisins í vinnumálum. Vinnumálaráðið umsitur alimál, arbeiðsmarknaðarmál, arbeiðsumhvørvismál, busskoyring, einkarrætt, elveitingarmál, farmakoyring, ferðavinnu, ferjur, handilsmál, jarðfrøði, javnstøðumál, kavaramál, kolvetni, kunningartøkni, merki, mynstur, oljumál, orkumál, samferðslumál, samskiftismál, sjóvinnumál, tónleikavinnu, tryggingarmál, tyrluflúgving, tó undantikið tyrlupallar, vanlukkutryggingarmál, veterinermál, vinnufeløg og vinnumál. Eisini umsitur ráðið integrasjónsmál og ferðslumál.

Uppgávur ráðsins mótvegis landsstýrismanninum í vinnumálum í hesum sambandi eru m.a. at:

- Ráðgeva
- Málsviðgera
- Fyrireika lógaruppskot, kunngerðir og reglugerðir
- Samskipa
- Fremja stovnseftirlit

Vinnumálaráðið arbeiðir harumframt áhaldandi við at:

- Gera ætlanir fyri øki, sum hava týdning fyri menning, vøkstur og virðisskapan innan verandi og nýggjar vinnur kring alt landið
- Gera ætlanir fyri, hvussu kapitalur og arbeiðsmegi verða tilskundað at flyta frá minni produktivum vinnum til meira produktivar vinnur
- Gera ætlanir fyri at skapa ein rúmligan, mennandi, virknan og tryggan arbeiðsmarknað

**Bygnaður:**
Vinnumálaráðið er skipað við aðalstjóra. Umsitingarøkir eru løgd til starvsfólk at umsita.

**Starvsfólk í stjórnarráðnum:**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skrivstovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | 9,3 | 2,7 | 13 |

| Stovnar, sum vísa til Vinnumálaráðið | Fulltíðarstørv | Nettojáttan 2014 í tkr. |
|---|---|---|
| Sjóvinnustýrið | 20,6 | 7.600 |
| Heilsufrøðiliga starvsstovan og Arbeiðseftirlitið | 31 | 17.632 |
| Jarðfeingi | 22 | 10.589 |
| Vinnufelagsskráseting og eftirlit | 20,3 | 4.000 |
| Barsilsskipanin umsiting*) | | 1.800 |
| Brúkaraumboðið | 1,2 | 1.100 |
| Rúsdrekkasøla landsins | 34,5 | -16.848 |
| Strandfaraskip Landsins | 144 | 141.575 |
| Ferðaráð Føroya | 5 | 13.900 |
| Akstovan | 17 | -325 |

*) Barsilsskipanin er løgd til Taks at umsita.

<u>Partafeløg:</u>
P/F Postverk Føroya
P/F Vága Floghavn
P/F Føroya Tele
P/F Fiskaaling
P/F Atlantic Airways
P/F Føroya Lívstrygging

# 5. Mentamálaráðið §7:

**Játtan til alla § 7 í 2014:** 1.067 mió. kr.
**Játtan til stjórnarráðið í 2014:** 17 mió. kr.

Mentamálaráðið fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan og herundir eisini dagstovnaøkið, kirkjumál og ítrótt. Mentamálaráðið hevur sum mál og mið at:

- Fyrisita, umsita og menna galdandi lóggávu í útbúgvingar-, granskingar- og mentamálum
- Seta í verk politikkin, sum er orðaður í samgonguskjalinum
- Hækka vitanarstøðið og mentanarmedvitið hjá borgarunum
- Tryggja mennandi karmar fyri virksemi innan útbúgving, gransking og mentan.

**Starvsfólk í stjórnarráðnum:**
**Mentamálaráðið hevur 23,65 ársverk**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skristovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 4 | 14,5[1] | 5,15 | 23,65 |

**Próvstovan (Próvtøkur) hevur 5 ársverk**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skristovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| | 1 | 4 | 5 |

**Yrkisdepilin hevur 3 ársverk**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skristovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 1 | 3 |

**Bygnaður:**

**Mentamálaráðið er skipað í hesar eindir:**
**Aðalskrivstovan** er ein stápseind undir aðalstjóranum. Virkisøkið umfatar samskipan, samskifti, almenn kunning, heimasíða, taluskriving, løgfrøðilig ráðgeving og góðskutrygging, kæruviðgerð, viðgerð av almennum innliti v.m.

**Politikkdeildin** hevur ábyrgdina av tí politikkfyrireikandi arbeiðinum í breiðum týdningi í Mentamálaráðnum. Tað snýr seg um at standa fyri, at álit o. l. verða orðað í sambandi við lógarfyrireikandi arbeiði. At gera uppskot til lógir og kunngerðir í tøttum samstarvi við løgfrøðingarnar í Aðalskrivstovuni. At hava yvirskipaða fakliga umsjón við virkseminum hjá ráðnum. At svara fyrispurningum í Løgtinginum. At hava málsviðgerðina av fakligum slagi.

**Stýrisdeildin** hevur sum aðalmál at tryggja eina skynsama gagnnýtslu av øllum tilfeingi innanfyri málsøkið hjá Mentamálaráðnum. Deildin stendur fyri fíggjarlógararbeiðinum hjá grein 7, sum skal verða gjørt í tøttum samskifti við restina av ráðnum og undirliggjandi stovnum. Mál- og avrikstýring er eitt amboð í arbeiðinum at tryggja eina skynsama gagnnýtslu av tilfeinginum. Tillutan av tímum til fólkaskúlarnar og forskipanin til lønarkoyringar er partur av virkseminum á deildini.

**Vitanardeildin** hevur sum aðaluppgávu at tryggja, at upplýsingar og hagtøl, sum tørvur er á í ráðleggingini hjá Mentamálaráðnum verða fingin til høldar, goymd og tøk á ein lættan hátt. Deildin skal standa fyri eini skynsamari ráðlegging av KT nýtsluni, har málið er ein samanhangandi talgild skipan fyri virksemið. Próvstovan er partur av Vitanardeildini, og málið er, at próvtøkuúrslitini verða brúkt í eftirmetingarhøpi. Nógvar av uppgávunum hjá Vitanar-

1 2 fulltrúastørv eru verkætlanarsett

deildini verða natúrliga loystar í tøttum samstarvi við Nám. Vitanardeildin hevur harumframt hond um byggimálini hjá Mentamálaráðnum í samstarvi við Landsverk. Innanhýsis tænasturnar, herundir journal, bókhald, hølisumsiting og fíggjarstýring v.m. eru partar av Vitanardeildini.

| **Stovnar, sum vísa til Mentamálaráðið** | **Fulltíðarstørv** | **Játtan 2014 í tkr.** |
|---|---|---|
| Studni | 4,7 | 2.990 |
| Nám | 19,6 | 11.625 |
| Fólkaskúlin | 739,0 | 286.601 |
| Sernámsdepilin | 68,0 | 30.201 |
| Rásin | 6,0 | 2.600 |
| Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy | 42,6 | 23.500 |
| Føroya Studentaskúli og HF-skeið | 103,0 | 58.950 |
| Klaksvíkar HF-skeið | 8,4 | 4.400 |
| Miðnámsskúlin í Suðuroy | 19,0 | 11.200 |
| Føroya Handilsskúli | 77,0 | 35.700 |
| Tekniski skúli í Tórshavn | 59,9 | 31.100 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 36,3 | 17.950 |
| Fiskivinnuskúlin | 11,0 | 5.700 |
| Heilsuskúli Føroya | 9,0 | 5.200 |
| Musikkskúlar | 49,0 | 12.167 |
| Vinnuháskúlin | 40,0 | 20.685 |
| Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli) | 5,0 | 3.700 |
| Sjónám (Trygdarmiðstøðin) | 5,0 | 1.500 |
| Føroya Brandskúli | 6,8 | 1.600 |
| Fróðskaparsetur Føroya | 114,0 | 71.752 |
| Granskingarráð Føroya (Rakstur) | 3,6 | 2.348 |
| Málráðið | 2,0 | 952 |
| Mentanargrunnurin (Rakstur) | 0,6 | 472 |
| Tjóðpallur Føroya | 10,0 | 4.315 |
| Søvn Landsins | 41,8 | 25.038 |
| Listasavn Føroya | 3,0 | 2.195 |
| Kringvarp Føroya | 74,0 | 900 |

# 6. Heilsumálaráðið § 11:

**Játtan til alla § 11 í 2014 :** 966 mió. kr. kr. (íroknað Apoteksverkið, ið javnvigar við gott 220 mió. kr.)
**Játtanin til stjórnarráðið í 2014:** 12 mió. kr.

Heilsumálaráðið hevur undir landsstýrismanninum yvirskipaða, fyrisitingarliga og fíggjarliga eftirlitið við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum og yvirskipaðu ráðleggingina av hesum málsøkjum undir ráðnum: Heilsumál (Fyribyrging, heilsutænastur, sjúkrahúsverkið v.m. og viðgerðarstovnar), uttanríkismál (Neyðhjálp) og almannamál (Gigni).

**Uppgávan hjá Heilsumálaráðnum er:**

- at ráðgeva landsstýrismanninum í heilsumálum
- at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur
- at veita stovnum og øðrum undir ráðnum ráð og vegleiðing

Heilsumálaráðið og Almannamálaráðið halda til í sama bygningi. Á henda hátt kann samstarv vera um partar av virkseminum, so sum starvsfólkamál, tænastu og kunningartøkni.

**Starvsfólk í stjórnarráðnum:**
**Heilsumálaráðið hevur 14,8 ársverk, og 11.753 tús. kr. í játtan.**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skrivstovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 4 | 6,8 | 4 | 14,8 |

**KT-øki heilsuverksins hevur 5 ársverk, og 7,5 mió. kr. í játtan.**

| Leiðsla | THS-verksetari/ráðgevi | KT- skrivstovustarvsfólk | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 1 | 4 | 1 | 6 |

**Bygnaður:** Heilsumálaráðið er skipað í hesar eindir:

**Aðalskrivstovan** hevur yvirskipaðu ábyrgdina av strategi og menning fyri Heilsumálaráðið, endaligu ábyrgdina av umsitingini, samskipar ta politisku ráðgevingina, hevur samskipandi leiklut, tá talan er um millumleiðarafunktiónir, yvirskipaðu ábyrgdina av umboðan úteftir og yvirskipaða ábyrgd av mál- og tilfeingisstýringini.

**Heilsupolitiskadeildin** hevur ábyrgdina av tí politikkfyrireikandi arbeiðinum í breiðum týdningi. Tað snýr seg um at fyrireika og orða uppskot til lógir og kunngerðir. Herundir at hava gjørt tað neyðuga kanningararbeiðið – skrivað í álitum ella líknandi. Til hesa deildina hoyrir eisini at svara fyrispurningum í Løgtinginum o.ø. Deildin hevur eisini um hendi fyrisitingarligu uppgávurnar í ráðnum.

**Heilsubúskapardeildin** tekur sær av øllum, sum hevur við tey heilsubúskaparligu viðurskiftini í sínum breiðasta týdningi at gera. Tað er heilt frá tí yvirskipaða, hvussu tilfeingið verður gagnnýtt, og hvat kemur burturúr, til hvussu játtanir verða veittar, umframt at gjøgnumganga roknskapir, fremja eftirlit og annað tílíkt.

**Talgilda heilsuskipanin, stápseind hjá Heilsumálaráðnum:**
THS er blivin ein týðandi partur í at gera upp virksemið innan heilsuverkið – umframt at vera eitt stýrings- og skrásetingaramboð í kliniska arbeiðsdegnum hjá bæði kommunulæknum og innan sjúkrahúsverkið. Hugsanin er at effektivera fyrisitingarligu stýringsaboðini gjøgnum THS.

**Felags rakstur:**
Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið halda til í sama bygningi. Samstarv er um partar av virkseminum, so sum starvsfólkamál og tænastu:

**HR-økið** tekur sær av lønar- og setanarviðurskiftum, starvsfólkaspurningum og at samskipa starvsfólkamenning fyri bæði ráðini. Millum uppgávurnar eru eisini at ráðgeva Fíggjarmálaráðnum í starvsfólkamálum í sambandi við sáttmálasamráðingar og at umboða Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið í sáttmálasamráðingum.

**Tænastueindin** tekur sær av øllum praktiskum arbeiði í ráðunum, so sum posti og journal, móttøku og vekslara, bókhaldsfunktión, viðlíkahaldi av bygningi og uttanduraøki, innkeypi o.ø.

| Stovnar, sum vísa til Heilsumálaráðið | Fulltíðarstørv | Játtan 2014 í tkr. |
|---|---|---|
| Landssjúkrahúsið | 706 | 397.555 |
| Klaksvíkar sjúkrahús | 138,5 | 64.835 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | 100,5 | 53.772 |
| Apoteksverkið (220,2 mió. kr. í útreiðslum/inntøkum) | 104,0 | 0 |
| Serviðgerð uttanlands, viðgerðir (LS, KS og SS) | 0 | 137.197 |
| - herundir ársverk hjá Sjúklingahotellinum | 17,9 | - |
| Hvíldarheimið Naina – (Kommunur o.o. fíggja tað mesta) | 14,0 | 2.031 |
| Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (íroknað gransking) | 8,0 | 2.051 |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdið | 8,3 | 5.684 |
| Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið | 9,5 | 5.684 |
| Gigni – heilsufrøði fyri børn & ung | 24,0 | 12.322 |
| Upplýsing og ráðgeving | 2,9 | 2.635 |
| Heilsutrygd | 10 | 7.422 |
| Ílegusavnið | 2,5 | 1.504 |

# 7. Almannamálaráðið § 12:

**Játtan til alla § 12 í 2014 :** 1.748 mió. kr.
**Játtan til stjórnarráðið í 2014:** 14 mió. kr.

Almannamálaráðið fyrisitur almannamál, bústaðarmál, kommunumál, val, økismenningarmál og útoyggjamál. Uppgávan hjá Almannamálaráðnum er:

- at ráðgeva landsstýriskvinnuni
- at tilevna lógaruppskot, kunngerðir og aðrar reglur
- at veita stovnum og øðrum undir ráðnum ráð og vegleiðing

**Starvsfólk:**

| Leiðsla | Fulltrúar o.o. | Skrivstovufólk o.o. | Starvsfólk íalt |
|---|---|---|---|
| 4 | 10[2] | 4,3 | 18,3 |

**Bygnaður:**
Almannamálaráðið er skipað soleiðis:

**Stápseindin** hevur yvirskipaðu ábyrgdina av strategi og menning fyri Almannamálaráðið, endaligu ábyrgdina av umsitingini, samskipar ta politisku ráðgevingina, hevur samskipandi leiklut, tá talan er um millumleiðarafunktiónir, yvirskipaðu ábyrgdina av umboðan úteftir og yvirskipaða ábyrgd av mál- og tilfeingisstýringini. Stápseindin umsitur eisini fíggjarlógararbeiðið, samskifti, ráðgeving og eftirlit við stovnum viðvíkjandi fíggjarligum viðurskiftum og samskifti við Landsgrannskoðara v.m. Harumframt umsitir stápurin lønar- og setanarviðurskifti, starvsfólkaspurningar og samskipar starvsfólkamenning fyri Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið. Millum uppgávurnar eru eisini at ráðgeva Fíggjarmálaráðnum í starvsfólkamálum í sambandi við sáttmálasamráðingar og at umboða Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið í sáttmálasamráðingum.

**Deildin fyri veitingar** umsitur m.a. lóggávuna fyri veitingar, bústaðarmál, leigumál, hagtøl og studning til feløg og altjóða sáttmálar og avtalur.

**Deildin fyri tænastur** umsitur lóggávuna fyri tænastur innan børn og ung, eldri og serforsorg, eins og verkætlanina harðskapur í parlagi og nærsambondum.

**Deildin fyri kommunumál** avgreiðir fyrispurningar og kærur um ymisk kommunal viðurskifti í sambandi við mál, ið snúgva seg um innihaldið/løggildið í kommunalum avgerðum, ymiskar mannagongdir sambært kommunustýrislóggávuni, heimildir hjá kommunustýrunum og uppgávur teirra. Harumframt umsitur deildin økismenningar- og útoyggjamál.

**Tænastueindin** tekur sær av øllum praktiskum arbeiði í ráðunum, so sum posti og journal, móttøku og vekslara, bókhaldsfunktión, viðlíkahaldi av bygningi og uttanduraøki, innkeypi o.ø. Eindin er formliga ein partur av Heilsumálaráðnum, men røkir uppgávur fyri bæði Almannamálaráðið og Heilsumálaráðið.

Almannamálaráðið heldur til á Eirargarði 2 saman við Heilsumálaráðnum og Talgildu Heilsuskipanini (THS).

2 1 fulltrúastarv verður lønt av játtanini til Verkætlanir

| Stovnar, sum vísa til Almannamálaráðið[3] | Fulltíðarstørv | Játtan 2014 í tús. kr. |
|---|---|---|
| Almannaverkið, fyrisiting v.m. | Uml. 89 | 49.877 |
| Almannaverkið, Trivnaðartænastur og Endurmenning | 608 | 246.401 |
| Almannaverkið, Eldraøkið | 898 | 355.160 |
| Sjóndepilin | 10 | 9.431 |
| Dugni skúlin og Dugni endurbúgving | 19 | 6.116 |

**3** Tøl tikin úr Fíggjarlógini fyri 2014.

# 8. Mett orkunýtsla í mun til virkisøki

| Nr. | Virkisøki | Nærri lýsing av uppgávunum í einstaka aðalráðnum | Mett orka (í%) | Umr. tal starvs-fólk |
|---|---|---|---|---|
| **Uppgávur av politiskum slag** | | | | |
| 1 | Politikfyrireikandi arbeiði | Greiningar, frágreiðingar og álit. Ofta arbeiði, sum endar í einari ella fleiri lógum. Dømi eru álit t.d. fólkavakstrarætlanin, útgreiningar t.d. Føroyar og Arktis, og „politikkir" t.d. eldrapolitikkur. | 10,1 | 15 |
| 2 | Lógarfyrireikandi arbeiði og lógar- og kunngerðarsmíð | Fyrireikandi arbeiði undan lógarsmíð t.d. skriva upprit í hesum sambandi. Lógar/kunngerðar smíð, herundir eisini rundskriv og vegleiðingar. | 12,7 | 19 |
| 3 | Politisk ráðgeving og aðrar lands-stýrismanna-tænandi uppgávur | Samskifti og ráðgeving um dagligu uppgávurnar hjá landsstýrisfólkunum. Eisini uppgávur av praktiskum slag í dagligdegnum hjá landsstýrisfólkinum t.d. at umsita kalendaran. | 6,9 | 10 |
| 4 | Arbeiði við játtanarkørmum og fíggjarlóg | Arbeiði við játtanarkørmum, fíggjarlóg og eykajáttan v.m. fyri alt málsøkið. | 4,1 | 6 |
| 5 | Løgtingið (Skrivligir/munnligir fyrispurningar o.s.fr.) | Tal av skrivligum, munnligum og §52 a fyrispurningum og annað samskifti við Løgtingið í hesari samgonguni. | 3,3 | 5 |
| 6 | Kunning, herundir røður og greinar til landsstýrismannin | Eisini tíðindaskriv, talupunkt og kunning á heimasíðum. | 3,0 | 4 |
| 7 | Millumtjóða samstarv | Millumtjóða samstarv eisini tvílanda samstarv inkl. Danmark t.d. samráðingar, luttøka í arbeiðsbólkum í millumtjóða samstarvi o.s.fr. Herundir eisini fyrireiking til luttøku á millumtjóða fundum. | 6,3 | 9 |
| | **Samanlagt** | | **46,3** | **69** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Uppgávur av fyrisitingarligum slag** | | | | |
| 8 | Generel málsviðgerð | Virksemi, sum ikki kemur undir politikfyrireikandi og lógarfyrireikandi og heldur ikki málsviðgerð í mun til borgarar og stovnar. Hetta kundi t.d. verið at svara landsgrannskoðanini, innlitsumbønum og umboðsmanninum. | 4,5 | 7 |
| 9 | Málsviðgerð og samskifti við borgarar, fyritøkur, áhugafelagsskapir o.s.fr. | At viðgera umsóknir og svara fyrispurningum íroknað klagur, sum ikki eru kærur sambært lóg. Umsiting av stuðulsjáttanum. Luttøka á fundum saman við landsstýrisfólkinum við borgarar, fyritøkur, áhugafelagsskapir o.s.fr. | 8,6 | 13 |
| 10 | Kæruviðgerð | Kæruviðgerð sambært lóg, sum ikki er starvsfólkamál | 1,5 | 2 |
| 11 | Samskifti og samskipan við undirliggjandi stovnum og kommunur | Samskifti, samskipan og eftirlit við undirliggjandi stovnum. Eisini mál og avriksstýring og gjøgnumgongd av roknskapum. | 9,1 | 13 |
| | **Samanlagt** | | **23,7** | **35** |
| **Uppgávur sum snúgva seg um rakstur** | | | | |
| 12 | Leiðsla | Leiðsla – leiða og býta uppgávur, bygnaður, strategi o.s.fr. Íroknað luttøku hjá starvsfólkum í ávísum leiðsluuppgávum t.d. strategiarbeiði. | 4,1 | 6 |
| 13 | Starvsfólkamál og HR | Fyri alt málsøkið og tvørvegis millum ráð. Málsviðgerð og kæruviðgerð í sambandi við starvsfólkamál. Lønarsamráðingar. | 4 | 6 |
| 14 | Fíggjarstýring og bókhald | Inni í aðalráðnum | 3,7 | 6 |
| 15 | KT | Super brúkarar, umsiting av ymsum KT skipanum, rakstur og viðlíkahald av heimasíðum. | 5,3 | 8 |
| 16 | Skráseting | Journalisering | 5,3 | 8 |
| 17 | Viðlíkahald/ reingerð o.s.fr. | | 2,9 | 4 |
| 18 | Móttøka /avgreið-sla, rættlestur og annars ganga til handa | | 5 | 7 |
| | **Samanlagt** | | **30** | **44** |

# 9. Felags virðisgrundarlag fyri landsfyrisitingina

**Missión:**
Landsfyristingin veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika

**Visjón:**
Fremst í nýskapan, arbeiðslagi og samskifti

| Virði | Hetta merkir at | Tí arbeiða vit soleiðis |
|---|---|---|
| Vit draga eina línu | vit samstarva væl<br>vit taka felags ábyrgd<br>vit fremja felags loysnir<br>vit halda somu kós | vit skapa eitt opið arbeiðsumhvørvi<br>vit kunna og arbeiða tvørtur um mørk<br>vit stuðla og stimbra hvønn annan<br>vit hava álit á og virðing hvør fyri øðrum<br>vit gera felags verkætlanir |
| Vit seta skynsemi í hásæti | vit raðfesta rætt<br>vit arbeiða dygdargott<br>vit arbeiða uttan drál<br>vit skapa virðir | vit seta mál og eftirmeta<br>vit hava einfaldar arbeiðsgongdir<br>vit leggja dent á trivnað og menning<br>vit fara væl um pengarnar<br>vit arbeiða gjøgnumskygt<br>vit hava stuttar og úrslitagóðar fundir<br>vit savna fordømir í vísdómsbók<br>vit miðja ímóti felags journal, telefon-skipan og høli |
| Vit vilja vita | vit menna okkara førleika<br>vit eru forvitin at læra<br>vit søkja vitan í altjóða høpi<br>vit vilja læra alt lívið | vit søkja, brúka og spjaða vitan<br>vit gera vitan atkomuliga<br>vit skapa og luttaka í netverkum<br>vit menna rætta førleika til røttu tíð<br>vit skipa fyri regluligum starvsfólkasamrøðum<br>vit gera menningarætlanir fyri starvsfólk<br>vit gera felags tiltøk<br>vit gera skipan fyri nýsett starvsfólk<br>vit stovnseta turnusskipanir |
| Vit bróta slóð | vit eru nýskapandi<br>vit menna nýggjar arbeiðshættir<br>vit fremja betri loysnir<br>vit ganga á odda | vit eru fús at broyta<br>vit brúka nýggja vitan og tøkni<br>vit stimbra og skapa karmar fyri nýhugsan<br>vit eru við í altjóða rákinum |

# 10. Stjórnarráð í øðrum londum

Her verður greitt leysliga frá, hvussu stjórnarráðini í Norðurlondum, Stórabretlandi og Hollandi eru skipað og virka. Upplýsingarnar eru í høvuðsheitum av almennum heimasíðum hjá stjórnarráðunum í avvarðandi londum, og úr norskum og donskum greiningum; men framsetingin hevur sum heild støði í eini rættiliga djúptóknari greining, „*På kryss eller tvers?*“ sum norska Statskonsult gjørdi um stjórnarráðini í skandinavisku londunum, Hollandi og UK í 2001. Sí annars tilfarslisti.

Ikki tvey lond hava nett sama slag av stýrisskipan. Enn minni er miðfyrisitingin skipað eftir sama leisti. Meinlík heiti hava mangan ymiskt innihald, alt eftir landinum, tú ert í. Tí ber ikki til at gera veruligar samanberingar, uttan eftir gjøllar kanningar í samstarvi við stjórnarráðini í avvarðandi londum, og ikki ber til við hesum at siga nakað eintýtt um t.d. hvussu ein framkomin miðfyrisiting átti at verið skipað, men ábendingar og hugskot tróta ikki.

Eitt er rættiliga merkisvert: Bert eitt av londunum, vit hava hugt eftir, nevniliga Svøríki, kann sigast nakrantíð seinastu 50 árini at hava endurskipað øll stjórnarráðini í einum, hóast onkur uppskot hava verið um hetta í øðrum londum. Altfevnandi svenska umskipanin í 1997 ávirkaði tó mest ítøkiliga leiðslurnar í stjórnarráðunum.

### Grundregluliga um stjórnarskipanir

Okkara stjórnarskipan er myndað eftir teirri donsku, sum er serstøk, samanborin við umrøddu evropisku lond, tí at øll ábyrgdin er hjá hvørjum ráðharra sær, meðan hvørki ráðharranevndir (tvørgangandi nevndir, har fleiri ráðharrar taka avgerðir í felag), ella stjórnin í felag hava formligar heimildir, og heldur ikki forsætismálaráðharrin hevur heimildir tvørtur um málsøki.

Í Hollandi hevur stjórnin lutfalsliga nógvar heimildir í felag (tó ikki í mun til løgfrøðiligar persónar), samstundis sum flestu heimildir eru hjá einstøku ráðharrunum og „vararáðharrunum“. Í Finnlandi hevur stjórnin í felag ávísar heimildir, eins og stórar heimildir liggja hjá ráðharranevndum. Í Svøríki ber illa til at tosa um ráðharraábyrgd eftir okkara fatan, tí heimildirnar eru hjá stjórnini í felag. Í Stórabretlandi hevur forsætismálaráðharrin serstakliga stórt vald; meðan lóggáva hevur minni at siga í mun til politiskar avgerðir. Norsku og íslendsku skipanirnar minna meira um ta donsku, um enn týðandi frábrigdi eru, serliga tí at stjórnin í felag hevur ávísar heimildir.

Skilligt er, at stjórnarskipanin fær fylgjur fyri, hvussu fyrisitingin er skipað. Øll umrøddu lond eru høgt í metum sum framkomin rættarsamfeløg, so allar umrøddu skipanir hava framúr dygdir, so ella so. Tí kann væl hugsast, at eisini Føroyar við fyrimuni kundu fingið íblástur úr ymsum skipanum og arbeiðsløgum, ið – havandi í huga, hvussu smáar eindirnar eru her – t.d. í størri mun leggja upp til politiska samskipan, og harvið eisini fyrisitingarliga samskipan.

### Stjórnarráðini

Londini tykjast hava ymsa fatan av høvuðsendamálinum við politisku skipanini og stjórnarráðunum – tó so, at fremsta høvuðsendamálið allastaðni er á effektivan hátt at tæna politiska viljanum innan teir karmar, sum lógir og siðvenja seta. Kortini er ymiskt, hvørt tingræði, ráðharraábyrgd, samskipan ella hetta, at fyrisitingarligar avgerðir skulu hava heimild í lóg, verður sett fremst. Seta vit tað einfalt upp, kunnu vit hóma eitt slag av stigbending:

Í Svøríki leggur skipanin størstan dent

á, at fyrisitingarligar avgerðir verða vardar móti politiskari ávirkan og eru heimilaðar í lóg, eins og stórur dentur er á politiska samskipan. Stýrisskipanin bannar, at nakað slag av boðum kann fara úr stjórnarráðunum til sjálvstøðugu verkini, har fyrisitingarligu avgerðirnar verða tiknar. Politiska skipanin stýrir verkunum við lógum og aðrari formligari, almennari regluseting einans. Í stjórnini og stjórnarráðunum verður avgerandi dentur lagdur á samskipan, so stjórnin hevur serstakliga nógvar væl skipaðar og fyrireikaðar fundir og tekur allar avgerðir í felag.

Í Finnlandi er stjórnararbeiðið eisini rættiliga fast skipað og reglusett, eins og í Svøríki. Fleiri avgerðir verða tiknar á stjórnarfundi, og nógv sløg av avgerðum (ið verða mettar at krevja samskipan) eru løgd til nevndir av ráðharrum at taka avgerð um í felag. Annars er – í málum, sum ikki eru løgd ráðharranevndum ella stjórnini at taka avgerð um – ráðharraábyrgd í okkara fatan av hugtakinum. Á summum málsøkjum er fyrisitingarlig málsviðgerð tó løgd til almenn verk, og tá røkka boð úr stjórnarráðnum henni ikki, men á flestum økjum er sambandið millum stjórnarráð og undirliggjandi stovnar á leið sum hjá okkum.

Í Íslandi var skipanin mest átøk teirri donsku, tó at fyrisitingarliga skipanin yvirhøvur er einfaldari, meira sum hjá okkum. Við lógini um Stjórnarráð Íslands broyttist íslendska skipanin munandi í 2011: Neyvari karmar vórðu settir um stjórnararbeiðið, eitt nú um hvørji málssløg skulu á stjórnarfund, og neyv krøv eru til stjórnarfundir og fundarfrásagnirnar frá stjórnarfundum, eins og greiniligari reglur eru fyri, hvussu ráðharrin ábyrgist av málsøki sínum, og at hann hevur skyldu at leita sær ráð hjá fyrisitingini, sum hevur skyldu at geva honum óheft, fakliga grundað ráð. Eisini eru grundreglur fyri, hvussu stjórnarráðini skulu vera skipað, hvussu evstu embætisfólkini verða sett, og hvussu forsætisráðharrin skal áseta siðreglur fyri starvsfólk í stjórnarráðunum og fyri ráðharrar, og ein serstøk nevnd er sett at hava umsjón við siðalagsligum viðurskiftum í stjórnarráðunum.

Í Noregi er ráðharraábyrgd, soleiðis sum vit kenna hana, men nøkur fá sløg av avgerðum, eitt nú um at leggja fram lógaruppskot, játtanarlógir og onnur mál av stórum týdningi, skal stjórnin taka í felag – og einans eftir at avvarðandi ráðharrar fyrst eru blivnir samdir á skrivliga fyrireikaðum fundi um málið, um málið rakar fleiri ráðharraøki.

Í Danmark er ráðharraábyrgdin sera víðfevnd, bæði í mun til undirliggjandi stovnar, sum ráðharrin ábyrgist beinleiðis av og hevur stórt ræði yvir, og í mun til stjórnina, sum als ikki hevur nakran formligan leiklut í felag. – Í donskum stjórnarrætti verður mett, at tað ikki hevði verið í stríð við stýrisskipanina, um stjórnarfundir ikki vóru.

Í Stórabretlandi ger valskipanin, at tingræðið mestsum er eitt eiti, tí vinnandi parturin oftast fær so stóran meiriluta. Í staðin tryggja tey tætta sambandið millum stjórn og ting við, at einans tinglimir kunnu sita í stjórn, og við at talið av ráðharrum og „vararáðharrum“ (trinni sløg: Ministers of State, Parliamentary Undersecretaries og Parliamentary Private Secretaries), er ovurstórt í mun til tað, vit kenna til. Eisini leggja tey avgerandi dent á politiska viljan og á siðvenju sum leiðreglu í fyrisitingini, heldur enn lóggávu, og tí eru stjórnarráðini sera stór; men kortini fyrireika og leggja summir stórir stovnar sjálvir mál fyri ráðharran. Forsætismálaráðharrin hevur serstakliga stórt vald og virknan leiklut, og tað er bert í avmarkaðan mun at taka munnin ov fullan at siga, at ráðharrar og stjórnarráð í týðandi málum virka eftir

boðum forsætismálaráðharrans, sum fyrst og fremst verða givin á stjórnarfundi.

Í Hollandi er skipanin rættiliga átøk teirri norsku, men haraftrat leggja tey sjáldsama stóran dent á at tryggja breiða undirtøku í øllum samfelagspørtum. Tí er ikki eins eintýtt samband millum stjórnarráð, stjórn og ting sum í hinum londunum: Til tess at tryggja undirtøku, eru 24 føst ráð, umboðandi samansett áhugamál. Tey hava ikki einans umsjón við (parti av) virkseminum í stjórnarráðunum, men kunnu eisini seta fram uppskot, og harvið geva einum stjórnarrráði boð, sum ikki nýtast fara umvegis ráðharran.

**Talva 1:** *Stjórnarráð og politikarar í úrvaldum londum, tal og manning*

| | Starvfólk | Stjórnarráð | Ráðharrar og vara"-ráðharrar | Tingmannatal (fólkavaldir einans) | Politisk embætisfólk |
|---|---|---|---|---|---|
| UK | 500000* | 26 | Uml.130 | 650 | 100* |
| Holland | 108000* | 11 | 20 | 225 | ? |
| Svøríki | 4600[1)] | 13 | 24 | 349 | 200 |
| Danmark | 3100[2)] | 19 | 22 | 175 | 29 |
| Finnland | 4200 | 12 | 19 | 200 | 54 |
| Noregi | 4620 | 16 | 18 | 169 | um 65* |
| Ísland | 609 | 8 | 9 | 63 | 9 |

**Keldur:** Flestu upplýsingarnar eru í 2014 tiknar av heimasíðunum hjá stjórnunum í avvarðandi londum (sí keldulista). Tølini merkt við * eru úr "*På kryss eller tvers?*", Statskonsult, 2001

1) Talið fyri svensku stjórnarráðini er eitt sindur misvísandi, tí størri útgreiningar verða vanliga útveittar til arbeiðsbólkar uttanfyri stjórnarráðini. Í 80 og 90 árunum arbeiddu vanliga millum 200 og 400 slíkir bólkar í senn.

2) Talið fyri donsku stjórnarráðini fevnir bert um stjórnarráðini sjálv (departementerne), og er tískil misvísandi lágt, tí summir av stovnunum (direktorater og styrelser) undir summum av ráðunum eisini røkja departementalar uppgávur.

Politiskir embætismenn í Noregi, Svøríki og Finnlandi, sum meira ella minni virka sum „vararáðharrar", eru ikki taldir sum ráðharrar her.

**Talva 2:** *Stjórnarráð og politikarar í úrvaldum londum, tal og manning umroknað lutfalsliga í mun til fólkatalið í Føroyum*

| | Fólkatal í mun til í Føroyum | Starvsfólk | Stjórnarráð | Ráðharrar | Politisk embætis-fólk | Tingmenn |
|---|---|---|---|---|---|---|
| UK | 1309,6 | 381,8 | 0,02 | 0,10 | 0,08 | 0,50 |
| Holland | 348,6 | 309,8 | 0,03 | 0,06 | 0,00 | 0,65 |
| Svøríki | 199,7 | 23,0 | 0,07 | 0,12 | 1,00 | 1,75 |
| Danmark | 116,1 | 26,7 | 0,16 | 0,19 | 0,25 | 1,51 |
| Finnland | 112,4 | 37,4 | 0,11 | 0,17 | 0,48 | 1,78 |
| Noreg | 105,6 | 43,7 | 0,15 | 0,17 | 0,62 | 1,60 |
| Ísland | 6,7 | 91,3 | 1,20 | 1,35 | 1,35 | 9,44 |

Vert er at leggja til merkis í talvu 1, at greitt samband er ikki millum talið av stjórnarráðum, og hvussu fólkaríkt landið er. Hinvegin sæst greidliga, at viðvent samsvar er millum fólkatalið í Norðurlondunum og starvsfólkatalið í stjórnarráðunum har. Stjórnarráðini í UK og Hollandi virka somikið øðrvísi, at ilt er at samanbera starvsfólkatalið har við tað í norðurlendsku skipanunum.

Tølini vísa tó kanska fyrst og fremst, at mark er fyri, hvør meining er í at umrokna í lutfalli eftir fólkatali, tí økini sum skulu verða røkt, og atlitini sum telja við, eru á leið tey somu uttan mun til fólkatal. Haraftrat sæst skilliga, at í mun til í øllum hinum londunum er politiski yvirbygningurin í Føroyum lutfalsliga munandi tyngri enn embætisligi yvirbygningurin.

Meðan vit so dánt kunnu hóma eitt viðvent samsvar millum fólkatal og ráðharratal, er skilligt, at viðvent samsvar er millum fólkatal og tingmannatal.

Eisini er merkisvert, at talið av politiskum embætisfólki alla staðni uttan í Svøríki (og í Íslandi, har tey hava eitt politiskt embætisfólk fyri hvønn ráðharra, meðan ráðharrarnir hava fá fólk undir sær) er serstakliga lágt í mun til talið av yrkisliga settum embætisfólki.

Í ongum av londunum er skipanin, at allir ráðharrar hava sítt egna stjórnarráð, heldur ikki í Danmark. Uttan mun til, um ráðharraábyrgd er, ella hvussu víðfevnd hon er, er tað sostatt ikki ein fortreyt, at hvør ráðharri sær ábyrgist av einum heilum stjórnarráði.

**Talva 3:** *Starvsfólk í stjórnarráðunum í mun til ráðharrar og tinglimir*

| | Starvfólk | Starvsfólk í mun til ráðharrar | Starvsfólk í mun til tingmenn |
|---|---|---|---|
| Svøríki | 4600 | 354 | 13 |
| Danmark | 3100[1)] | 163 | 18 |
| Finnland | 4200 | 350 | 21 |
| Noregi | 4620 | 289 | 27 |
| Ísland | 609 | 76 | 10 |
| Føroyar | 148 | 21 | 4 |

Talva 3 vísir, at føroysku stjórnarráðini hava nógv minstu manning, bæði í mun til tingmannatal og í mun til landsstýrisfólk. Uppgávan hjá embætisverkinum er at tæna politisku skipanini, og at tryggja, at lóggávan verður hildin og eftirlivað. Tá embætisverkið er sera lítið í mun til talið av politikarum, verður lutfalsliga minni orka til at tæna politiskt.

## Politiskir embætismenn

Í nógvum londum (øllum teimum, sum vit hava hugt eftir her) hava tey politiskt sett embætisfólk, sum koma og fara saman við stjórnarlimunum, aftrat teimum embætisliga settu, sum eru í føstum størvum. Tvær av høvuðsgrundgevingunum fyri hesum eru, at miðfyrisitingin veksur, so hvørt sum virkisøkini hjá landsmyndugleikunum verða fleiri og meira torgreidd og staklutakend. Samstundis gera broyttu arbeiðshættirnir hjá fjølmiðlunum, at ráðharrar noyðast at nýta alt meira tíð til løtubær „miðlamál", og tí hava verri stundir til at hugsa um langskygd politisk mál. Bæði hesi viðurskifti gera, at ráðharrar verða alt meira bundnir at ráðgeving – eisini um politisk viðurskifti.

Grundregluliga eru tvinnir hættir at styrkja gjøgnumslagskraftina hjá einum ráðharra:

„Vararáðharrar": Eru politiskt tilnevndir, men hava hartil sjálvstøðugar politiskar leiklutir, sum formligir ella, ið hvussu so er, fastir alment viðurkendir karmar eru um. Í UK, Hollandi, Svøríki, Noregi og Finnlandi hava tey vararáðharrar, sum tó hava ymisk heiti.

Í Hollandi, Svøríki, Noregi og Finnlandi eru teir tó formliga sæð ikki vararáðharrar, men eitt serstakt slag av politiskum embætismonnum. Allastaðni er greiður formligur skilnaður millum „vararáðharrarnar" og hinar politisku embætismenninar. Í UK hava flestir av vararáðharrunum ikki atgongd til stjórnarfundir, meðan hálendsku vararáðharrarnir eru fastir partar av stjórnarfundunum, og í øllum málum kunnu virka vegna ráðharran. Í hinum londunum eru ymisk avbrigdi millum hesi.

Ein høvuðsuppgáva hjá „vararáðharrunum" er at leggja størri kraft aftanfyri politisku ávirkanina í embætisverkinum, annaðhvørt við at „vararáðharrin" (sum eitt nú í Svøríki) kemur at virka sum evsti embætismaður í fyrisitingini, sum eisini hevur „aðalstjóran" undir sær, ella við at „vararáðharrin" arbeiðir burturav við onkrum minni parti av málsøki ráðharrans, í summum førum við egnari heimild, í øðrum førum vegna ráðharran. „Vararáðharrin" virkar (í sera skiftandi mun í ymsu

londunum) eisini útvent í egnum navni, eisini í mun til fjølmiðlarnar.

Politiskt tilnevndir embætismenn: Hava einans heimild frá ráðharranum og eru í øllum londunum, vit hava hugt eftir. Talið er lítið í mun til talið av føstum embætisfólki (sí talvu 1).

Hetta slagið av politiskum embætismonnum eru reinar stápsfunktiónir hjá politikarunum, sum ikki kunnu geva nøkrum parti av embætisverkinum boð, og sum í fleiri av londunum heldur ikki arbeiða saman við vanligu embætisfólkunum.

Í Íslandi eru aðstoðarmenninir hjálparar burturav, sum heitið sigur, og geva ikki fyrisitingini boð. Líkt er til, at teir bert arbeiða við slíkum sum politiskari ráðgeving til ráðharran, samskipan og kunning innanstjórnar og í mun til flokkin, og við samskifti við miðlarnar.

Økini eru greidliga og nágreiniliga reglusett í Svøríki og Finnlandi, og eru lutvís reglusett í Noregi, og reglurnar eru ymiskar fyri ymisk sløg av politiskum embætisminnum. Í Danmark eru tey fyri fáum árum síðani alment farin undir skipanina, og har eru ikki so neyvar reglur.

Í Svøríki fóru tey undir at seta politiskar embætismenn longu í 1917. Í Svøríki eru 3 ferðir so nógv politisk embætisfólk í mun til yrkisligu embætisfólkini sum í nøkrum av hinum londunum, vit hava hugt eftir, sí talvu 1. Svøríki er einasta land, har føstu embætisfólkini ikki eisini veita politiska ráðgeving. Í hinum londunum, ið byrjaðu siðvenjuna við politiskum embætisfólkum nógv seinni, sær tað ikki út til, at skipanin við politiskum embætisfólkum hevur havt við sær, at hægstu embætisfólkini eru givin at veita politiska ráðgeving.

## Samskipan

Í øllum londum er samskipan ein av stóru avbjóðingunum. Arbeiðsbýti og spesialisering skapa í sjálvum sær samskipanartrupulleikar; men henda avbjóðing veksur alsamt. Sum svenska demokratirådet skrivaði í 2000: *„Aldrig förr har så mycket varit politisk beslutat. Omsorg om barn, vård av äldre, stöd vid depression, upphovsrätt på Internet, kontroll av kött, utsläpp från bilar, brännbarheten hos kläder, takvinkelen på hus, hjälmar vid cykling och rökning på offentlig plats. Allt är politik.“* – So hvørt sum alt fleiri øki verða politiskt reglusett, økist talið av markamótum millum ymsu málsøkini – og harvið tørvurin á samskipan (sí eisini fjórða part, *„Dagsins samfelag”*).

Av tí at bæði stjórn, stjórnarráð og miðfyrisiting her á landi eru so smá, átti at ligið væl fyri at verið betri samskipað enn lond flest, uttan at hetta nýtist kosta so ovurhonds orku. Tí greiða vit her stutt frá ymsum viðurskiftum, sum vanliga verða mett merkisverd í einstøku londunum, tá um samskipan ræður.

Í UK kemur nógv samskipan mestsum av sær sjálvari, av tí at forsætismálaráðharrin, fíggjarmálaráðharrin og stjórnarráð teirra hava so sterkan leiklut.

Eitt heilt annað tiltak, ið er við til at tryggja samskipan og samanhang í stjórnarráðunum í UK, er, at evstu embætisfólkini í UK øll eru starvssett í eini felags eind, Senior Civil Service, sum fevnir um 3000 tey hægstu embætini. Hesi eru tí ikki starvssett í nøkrum ávísum stjórnarráði, men verða frítt flutt millum stjórnarráðini, alt eftir hvar størstur tørvur ella eftirspurningur er eftir dygdum og førleikum hins einstaka. – Líknandi skipan er eitt nú í Fraklandi.

Ráðharrar uttan stjórnarráð ella málsøki taka sær av samskipan burturav, og viðhvørt verða eisini „supervising ministers“ settir at samskipa arbeiðið millum fleiri stjórnarráð innan serliga raðfest øki, men hetta hevur elvt til trupulleikar viðvíkjandi ábyrgd.

Eisini verða viðhvørt settar ráðharranevndir at tryggja samskipan; men yvirhøvur meta bretar, at samskipan millum stóru bretsku stjórnarráðini er ein avbjóðing.

Í Svøríki kemur nógv av samskipanini – bæði embætisliga og politiskt – mestsum av sær sjálvari, tí stjórnin tekur avgerðirnar í felag. Harafturat eru stjórnarfundirnir serstakliga nógvir (seks fastir stjórnarfundir um vikuna) og neyvt fyrireikaðir frammanundan. Eisini eru fleirfeldar, tvungnar mannagongdir fyri samskipan á embætismannastøði, áðrenn mál sleppa á skrá til stjórnarfund. Reglur eru eisini um, hvørji sløg av málum raka fleiri stjórnarráð, og hvørjar mannagongdir skulu tryggja samskipan fyri hvørt málsslag. Neyv samskipan og fyrireiking krevst eisini í skipan sum teirri svensku: Í 1999 t.d. tók svenska stjórnin umleið 9000 formligar avgerðir, ella í meðal slakar 200 um vikuna.

At stovnarnir eru skipaðir í verk, sum stjórnarráðini ikki skulu hava samband við, tryggjar, at sektoráhugamálini ikki á so ítøkiligan hátt skugga fyri samskipan og samstarvi á stjórnarstigi.

Endiliga blivu øll svensku stjórnarráðini í 1997 løgd saman, so at tey í grundini eru deildir í einum felags bygnaði, Regeringskansliet. Sostatt ber til at siga, at svensku stjórnarráðini í grundregluni virka sum ein felags stápur hjá stjórnini – ikki hjá hvørjum ráðharra sær – og forsætismálaráðharrin er evsti fyrisitingarleiðarin.

Eitt átak, sum ikki er bygnaðarligt, men tó ætlað at fremja eindarhugsan og felagsskap, er, at leiðararnir í stjórnarráðunum saman skulu gjøgnum serliga tillagaðar leiðsluútbúgvingar.

Sviar meta sjálvir, at teirra skipan gevur sjáldsama góða samskipan, og at tað er hon, sum ger munin, so teir eitt nú so lutfalsliga ofta fáa sjónarmið síni framd í ES-høpi.

Í Finnlandi eru rættiliga neyvar skrivligar mannagongdir fyri stjórnarfundir, og stjórnin hevur summar heimildir í felag. Eisini leggur stýrisskipanin ráðharranevndum heimildir í mongum málum, sum røkka tvørturum ráðharraøki, heldur enn einstøkum ráðharrum.

Serstakt er kravið um, at 2/3 meiriluti skal vera fyri týðandi lógarbroytingum. Harvið hevur ein og hvør stjórn ikki annað í at velja enn at finna breiðar semjur, ella ið hvussu so er eitt ávíst minstamark av breiðari undirtøku, tá um stórar avgerðir ræður. Tað tekur longri tíð at leggja kósina um, men afturfyri verður hon meira støðug.

Íslendska skipanin er eftir danskari fyrimynd, so til broytingina í 2011 var formliga samskipanin eisini har mestsum ikki til. Nú hevur forsetisráðharrin heimild at seta ráðharranevndir um ávís evni, og siðvenja hevur verið, at arbeiðsbólkar, har politiskir embætismenn, einstakir ráðharrar og viðhvørt eisini yrkisliga settir embætismenn og/ella tinglimir kunnu arbeiða í felag við avmarkaðum verkevnum, áðrenn tey koma formliga til viðgerðar á stjórnarstigi. Nú er eisini staðiliga ásett, hvat slag av upplýsingum ráðharri hevur skyldu at kunna um á stjórnarfundi. Haraftrat er ásett, at ráðharrar skulu kunna á stjórnarfundi um, hvørjir fundir hava verið millum stjórnarráðini og við uttanhýsis partar, og stjórnarráðunum áliggur at gera yvirlit yvir allar slíkar fundir.

Í Noregi er merkisvert, at føst siðvenja er, at umframt politisku embætisfólkini hjá forsætismálaráðharranum eru eisini politisk embætisfólk fyri allar hinar flokkarnar í samgonguni í starvi í forsætismálaráðnum. Endamálið er at tryggja støðugt samskifti tvørturum flokkarnar, og at tryggja politiska samskipan um týðandi politiskar ætlanir tíðliga.

Eisini tryggja tey samskipan í størri málum við at fast eru minst tveir stjórnarfundir um vikuna (regjeringskonferanser), har upp til 3 síður long upprit liggja til

grund fyri viðgerðini – og tá mál røra fleiri ráðharraøki, kunnu tey ikki koma á stjórnarfund, fyrr enn avvarðandi ráðharrar frammanundan eru blivnir samdir um tey á skrivliga fyrireikaðum fundum.

Í Danmark er sum sagt sera víðfevnd ráðharraábyrgd, so formliga ber samskipan næstan ikki til. Í verki hevur forsætismálaráðharraembætið tó átikið sær alt sterkari politiskt samskipandi leiklut, soleiðis at forsætismálaráðharrin setir meira ella minni fastar ráðharranevndir, sum eftir stýrisskipanini ikki hava formliga avgerðarheimild, men kortini hava rættiliga stóra ávirkan á førda politikkin. Men av tí at samskipanin ikki er formliga grundað, er ikki lætt at siga nakað uttanífrá um ta samskipan, ið er, men hon er lítil í mun til flestu hini londini.

Í Hollandi hevur stjórnin summar avgerðarheimildir í felag, og onnur samskipandi átøk eru roynd – eitt nú breiðar samskipanarnevndir millum ráðharraøki. Yvirhøvur tykist politisk samskipan ikki at verða eitt høgt raðfest mál, tí skipanin heldur leggur doyðin á frammanundan at tryggja breiða undirtøku fyri atgerðum. Hetta ger avgerðartilgongdirnar drúgførar, og at skipanin ikki altíð sýnist serliga virkisfør úteftir. Eitt nú verður Holland – beint mótsett Svøríki – mett at hava minni ávirkan í ES-høpi, enn tað kundi havt í mun til støddina á búskapinum, tí samskipanin er so veik; men afturfyri er innlendispolitiska kósin yvirhøvur støðug, um enn skipanin hevur havt ilt við at taka støðu til ávís sløg av trupulleikum. – Samstundis hevur skipanin, við at arbeiða heldur óformliga og mestsum uttan mun til málsøki, givið eitt annað slag av virkisføri, tí Holland hevur mangan tikið nýskapandi avgerðir um truplar spurningar –eitt nú í summum etiskum málum – so at landið verður mett sum undangonguland, ella ið hvussu so er nakað fyri seg á fleiri økjum.

## Viðurskifti ið virka móti samskipan

Norska greiningin *„På kryss eller tvers?"* nevnir nøkur viðurskifti, ið virka móti samskipan í og millum stjórnarráðini.

Bæði í UK og Svøríki verða avrikssáttmálar við undirliggjandi stovnar, og hetta, at stovnarnir fáa størri sjálvræði, nevnd sum dømi um, at fyrisitingin verður ment ein veg, ið ikki ger tað lættari at stjórna eftir heildaratlitum.

ES verður í øllum av londunum, sum eru limir, mett at elva til nógv størri trupulleikar við samskipan, og til at fyrisitingin bólgnar. Orsøkin er arbeiðslagið í ES: Mál verða fyrireikað á lágum embætisstigi – millum umboð fyri stovnar í londunum, heldur enn fyri stjórnarráðini – og ofta í tøttum samstarvi við áhugafelagskapir. Málini koma tí so seint til politiska støðutakan, at talan mangan heldur er um, at politikarar avgreiða avgerðir, heldur enn at taka tær, ella taka stig til teirra.

Nú er Føroyar ikki í ES, men trupulleikin er kortini viðkomandi, tí tað er arbeiðslagið, ikki ES í sjálvum sær, sum kann føra til slíka gongd: Av tí at føroyska samfelagið hevur so fittliga stødd, meðan stjórnarráðini eru smá, er sjálvsagt, at vit kunnu fáa dygdarbetri og meira viðkomandi politiskar avgerðir og lógir, um vit í størri mun leggja okkum eftir at taka umboð fyri øll viðkomandi seráhugamál betri við upp á ráð; men royndirnar hjá ES-londunum benda á, at hetta eigur at verða gjørt við umhugsni og fyriliti, so at avgerðirnar ikki firrast frá politikarunum til markamótið millum embætisverkið og seráhugamálini.

# 11. Tilfar

Her er eitt yvirlit yvir nakað av tilfarið, sum hevur verið grundarlag fyri kjakupplegginum og er viðkomandi í hesum samanhangi. Alt tilfarið er tøkt á internetinum.

**Viðkomandi heimasíður:**
Donsku stjórnarráðini: http://stm.dk/_a_1617.html
Ensku stjórnarráðini: https://www.gov.uk/#departments-and-policy
Finsku stjórnarráðini, svensktmælt heimasíða: http://statsradet.fi/etusivu/sv.jsp
Hollendsku stjórnarráðini, ensktmælt heimasíða: www.government.nl
Íslendsku stjórnarráðini: www.government.is
Norsku stjórnarráðini: www.regjeringen.no
Svensku stjórnarráðini: www.regeringen.se
– Serliga nýggjasta ársfrágreiðingin: http://www.regeringen.se/sb/d/108/a/234579
OECD um stýring av almenna geiranum: http://www.oecd.org/governance/
DIFI – um menning av norska almenna geiranum: www.difi.no
Á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni er yvirlit yvir almenn føroysk álit:
http://www.tinganes.fo/logir/alit/yvirlit.htm

**Annað tilfar:**

Betænkning 1537 (2013): Ministrenes særlige rådgivere – et serviceeftersyn.
Betænkning 1443 (2004): Embedsmænds rådgivning og bistand.
Betænkning 1354 (1998): Udvalget vedr. forholdet mellem minister og embedsmænd.
Finansministeriet (2006): Centraladministrationens organisering – status og perspektiver.
Forum for Offentlig Topledelse (2005): Public Governance – kodeks for god offentlig topledelse i Danmark. www.publicgovernance.dk
Lög um Stjórnarráð Íslands http://www.althingi.is/lagas/nuna/2011115.html
Lógaruppskot og álit um Stjórnarráð Íslands http://www.althingi.is/altext/139/s/1191.html
Statskonsult (2001): På kryss eller tvers? Departementsstrukturen i Nederland, Storbritannia, Sverige, Finland og Danmark.
Statskonsult (2000): Framtidens Departement.
Statskonsult (1999): Kartlegging og analyse av ressursbruken i departementene.
Tala Jyrki (2013): Lagstiftningsvärlden förändras – regelverket fortsätter att växa. Nordisk Administrativt Tidsskrift nr. 2/2013, 90. Årgang.
Thurid Hustedt & Jan Tiessen (2006): Central Government Coordination in Denmark, Germany and Sweden – An Institutional Policy Perspective. Universitätsverlag Potsdam.
Werner Jann and Sylvia Veit (2010): Politicisation of Administration or Bureaucratisation of Politics“ The case of Germany. Universitätsverlag Potsdam.

Føroya Landsstýri
mars 2014